# MENTAN OG MENNING

# MENTAN OG MENNING

## Mentanarpolitisk ætlan 2002-2006

Mentamálastýrið 2002

*Mentan og menning*
Mentanarpolitisk ætlan 2002-2006.
Útgevari: Mentamálastýrið, 2002
Perma: Stephanssons hús
Umbróting, repro, prent og innbinding: Hestprent

ISBN 99918-930-7-9

# Yvirlit

FORORÐ . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 7

**Mentanarpolitikkur í søguligum og samfelagsligum baksýni** . . . . . . . 9
1.1. INNGANGUR . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 10
1.1.1. Orðaskifti um mentan, list og mentanarpolitikk . . . . . . 10

1.2. HUGTØK OG MENTANARPOLITISK RÁK . . . . . . . . . . . 11
1.2.1. Broytingartíð og altjóðagerð . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 11
1.2.2. Mentanarpolitikkur – hví og fyri hvønn? . . . . . . . . . . . . 12
1.2.3. Mentanarpolitikkur sum heild . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 13
1.2.4. Mentan og mentanarhugtøk . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 15
1.2.5. Mentan og vinnulív . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 18
1.2.6. Nýggir miðlar, nýggj tøkni – netverksamfelagið . . . . . . 20

1.3. FØROYSKAR FORTREYTIR . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 21
1.3.1. Mentanarpolitikkur í føroyskum søguligum baksýni . . 21
1.3.2. Mentan og samfelag . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 24
1.3.3. Mentan og olja . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 27

1.4. MENTANARPOLITIKKUR Í NORÐURLONDUM . . . . . . 29
1.4.1. Mentanarpolitikkur sum partur av vælferðarsamfelagnum 29

**Mentanarpolitikkur**
**Menningaræltan fyri skapandi og útinnandi list 2002-2006** . . . . . . . . 33
2.1. ENDAMÁL, INNIHALD OG VERKSETING . . . . . . . . . . . 34
2.1.1. Mál . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 34
2.1.2. Innihald . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 34
2.1.3. Ítøkilig tiltøk . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 35
2.1.4. Samstarv millum land og kommunur . . . . . . . . . . . . . . . 36
2.1.5. Íverkseting . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 37

2.2. FELAGS FYRI LISTAØKI OG LISTAFÓLK . . . . . . . . . . . . 39
2.2.1. Mentanargrunnur Landsins – flaggskipið í mentanarpolitikkinum 39
2.2.2. Skapandi og útinnandi list . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 40
2.2.3. Annað mentanarligt virksemi . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 41
2.2.4. Filmslist, netlist og margmiðlar . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 41
2.2.5. Bygnaður og skipan . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 43
2.2.6. Umsiting . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 44
2.2.7. Játtan . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 44

2.3. SOSIAL OG BÚSKAPARLIG VIÐURSKIFTI ........... 46
2.3.1. Virkisumstøður og lívskor ........................ 46
2.3.2. Rættindi og lóggáva ........................ 46
2.3.3. Virðislønir ........................ 48
2.3.4. Kringvarp og list ........................ 48

2.4. FYRISITING OG ALTJÓÐA SAMSTARV .............. 50
2.4.1. Mentamáladeildin ........................ 50
2.4.2. Játtan til mentanarpolitisk endamál ................ 50
2.4.3. Norðurlendskt mentanarsamstarv og Útnoðurssamstarv 50
2.4.4. Annað altjóða samstarv ........................ 51

2.5. SKAPANDI OG ÚTINNANDI LIST .................... 53
2.5.1. Bygnaður og skipan ........................ 53
2.5.2. Mentanarráð Føroya ........................ 53
2.5.3. Listaráð ........................ 53
2.5.4. Listafólkasamband Føroya – LISA ................. 54

2.6. LISTAØKIÐ ........................ 57
2.6.1. List í dagsins samfelagi ........................ 57
2.6.2. Myndlist ........................ 59
2.6.2.1. Endamál ........................ 59
2.6.2.2. Broytingar og ábøtur ........................ 60
2.6.2.3. Onnur mennandi tiltøk ........................ 61
2.6.2.4. Útbúgving og eftirútbúgving ................ 63
2.6.2.5. Myndlistaráð ........................ 63
2.6.3. Bókmentir ........................ 65
2.6.3.1. Endamál ........................ 65
2.6.3.2. Rithøvundar – arbeiðsumstøður ............. 66
2.6.3.3. Bókin ........................ 67
2.6.3.4. Bókmentaráð ........................ 67
2.6.4. Tónlist ........................ 69
2.6.4.1. Endamál ........................ 69
2.6.4.2. Tónlistaráð ........................ 70
2.6.5. Leiklist ........................ 72
2.6.5.1. Leikpallur Føroya ........................ 72
2.6.5.2. Endamál ........................ 73
2.6.5.3. Mál og langtíðarætlan ........................ 74
2.6.5.4. Leiklistaráð ........................ 74

SAMANDRÁTTUR ........................ 76
HEIMILDIR ........................ 78
HAGTØL ........................ 79

# Fororð

Í 1996 kom út mentanarálitið *Avmarkaður marknaður*, ið á mangan hátt var eitt slóðbrótandi rit. Álitið fevndi um stóran part av mentanarøkinum. Støðan hjá list og listafólki varð lýst og greinað, og mong áhugaverd uppskot til ábøtur vórðu sett fram. Álitið snúði seg eisini um støðuna á teimum stovnum, ið varðveita og røkja mentanararvin, og víst varð á tørv og neyðturviligar broytingar. *Avmarkaður marknaður* varð ongantíð lagt fyri Føroya Løgting. Tó eru einstakir partar av tilmælunum í hesum áhugaverda áliti settir í verk, meðan aðrir týðandi tættir enn liggja á láni.

Nógv er fráliðið og so mong viðurskifti broytt, síðan *Avmarkaður marknaður* kom út, at Mentamálastýrið hevur ásannað, at tørvur er á einum uppfylgjandi áliti. *Avmarkaður marknaður* var í stóran mun skrivað av listafólkum og embætisfólkum á mentanarstovnunum. Hetta álitið *Mentan og menning* er gjørt í Mentamálastýrinum, og øll, ið hava verið við í arbeiðinum, eiga stóra tøkk uppiborna fyri avrikið.

Undir arbeiðinum hevur Mentamálastýrið fingið góð ráð og góð hugskot frá mongum einstaklingum og felagsskapum. Somuleiðis hava høvundarnir fingið íblástur og heintað hugskot úr útlendskum, serstakliga norðurlendskum, bókmentum um mentanarpolitikk. Tveir hoyringarfundir hava verið, har umboð fyri LISA, limafeløgini hjá LISA og onnur listafeløg, viðkomandi mentanarstovnar, Kommunusamskipan Føroya, Føroya Kommunufelag og bókaforløg hava gjørt sínar viðmerkingar til handritið. Teksturin er lutvís tillagaður sjónarmiðunum hjá hoyringarpørtunum.

Vit liva í eini tíð við altjóðagerð og stórum broytingum á mongum samfelagsøkjum – ikki minst á mentanarøkinum. Í hesi broytingartíð hava vitan, førleikar og skapanarevni stóran týdning fyri samleika og menning. Í 1999 legði landsstýrið fram álitið *Føroyskur førleiki* við eini menningarætlan fyri útbúgving og gransking. Álitið *Mentan og menning*, sum nú verður lagt fram, viðger serliga menningarætlanir fyri tað mentanarøkið, ið fevnir um list og listaligt virksemi. Samband er millum mentan og menning, og ein av mongum fortreytum fyri eini tryggari og burðardyggari samfelagsmenning er eitt blómandi mentanarlív. Neyðugt er tí við einum miðvísum mentanarpolitikki, ið fær breiða undirtøku á tingi og millum manna.

Endamálið við hesum áliti er í fyrsta lagi at seta upp mál og mið fyri føroyskum mentanarpolitikki í einum komandi fimm ára tíðarskeiði. Í øðrum lagi er endamálið at koma við uppskotum og hugskotum um, hvussu røkkast kann teimum málum, ið eru sett upp í álitinum, og í triðja lagi verða sett fram ítøkilig uppskot um, hvussu nógv, ið eigur at verða játtað til mentanarøkið í ætlanarskeiðinum. Hetta álit røkkur bert um list og listaligt virksemi. Ætlanin er seinni at koma við álitum um ávikavist varðveiting av mentanararvi, ítróttapolitikki og barna- og ungdómspolitikki.

*Mentan og menning* er uppskot til miðvísan mentanarpolitikk og verður lagt fram fyri løgting og almenning til umrøðu og orðaskifti. Tað er umráðandi at fáa eina breiða semju um meginreglurnar í mentanarpolitikkinum, so at tey, ið starvast við mentan og list, kenna karmarnar og kunnu kenna seg trygg við virkisumstøðurnar.

Tað er við hesum viðurskiftum í huga, at mentanarpolitiska ætlanin fyri 2002-2006 verður løgd fram. Vón mín er, at løgting og almenningur fara at taka væl ímóti ætlanini, og at hon fer at verða til stimbran og menning av føroyskari mentan og harvið til gagns fyri alt Føroya fólk.

*Óli Holm*
*landsstýrismaður*

# MENTANARPOLITIKKUR

## í søguligum og samfelagsligum baksýni

# 1.1. Inngangur

## 1.1.1. Orðaskifti um mentan, list og mentanarpolitikk

Tá ið landsstýrið í 1996 gav út mentanarálitið, *Avmarkaður marknaður*, var ætlanin, at hetta álitið skuldi mynda støðið undir einum breiðum orðaskifti um mentan og mentanarpolitikk. Hetta orðaskiftið skuldi eftirfylgjandi mynda støðið undir føroyskum mentanarpolitikki í eitt ávíst tíðarskeið framyvir.

Men hóast álitið *Avmarkaður marknaður* var upplýsandi og nýskapandi á mongum økjum, so kom ikki stórvegis orðaskifti burturúr, og tað kom heldur ikki nakar beinleiðis miðvísur mentanarpolitikkur burtur úr álitinum. Álitið *Avmarkaður marknaður* var ongantíð viðgjørt á løgtingi, men tað hevur tó ivaleyst havt týdning fyri tey mentanarligu framstigini, ið eru hend seinastu árini. Nógvar ábøtur, sum eru gjørdar á mentanarøkinum seinastu 4 árini, stava meira ella minni frá hugskotum úr *Avmarkaðum marknaði.*

Álitið *Avmarkaður marknaður* verður saman við hesum uppskoti lagt fram, og vónar Mentamálastýrið at fáa eitt gott og sakligt orðaskifti. Hetta orðaskifti kann síðan mynda støðið undir tí parti av mentanarpolitikkinum, ið røkkur um list og listaligt virksemi tey komandi árini. Hugskotini í hesum áliti koma ikki beinleiðis í staðin fyri mentanarálitið *Avmarkaður marknaður*. Heldur er tað at meta sum ein dagføring, eitt ískoyti og ein virkisætlan.

Í álitinum *Mentan og menning* verður útgreinaður og myndaður ein ítøkiligur mentanarpolitikkur, ið løgting og landsstýri í felag vónandi fremja í verki í einum komandi fimm ára skeiði. Tað verður við hesum áliti eisini lagt upp til, at mentanarpolitikkurin skal fremjast í samstarvi millum land, kommunur og felagsskapir. Hetta verður mett sum ein fortreyt fyri, at mentanarpolitikkurin skal hepnast, og er tað tí umráðandi, at breið semja fæst á tingi um henda politikk.

# 1.2. Hugtøk og mentanarpolitisk rák

## 1.2.1. Broytingartíð og altjóðagerð

Vit liva í eini mentanarligari broytingartíð. Altjóðagerðin, globaliseringin, kunningar- og samskiftistøknin, nógv økta sambandið og samskiftið millum lond og ymsar mentanir elva til eitt trýst á norðurlendska og føroyska mentan sum ongantíð áður.

Henda støða er ikki negativ, tí hon fevnir um møguleikar. Nýggja kunningartøknin, økta samskiftið og altjóðagerðin geva føroyingum eins væl og øðrum tjóðum økt valfrælsi og øktar virkismøguleikar á eitt nú mentanar- og listaøkinum. Henda støða hevur eisini avdúkað, at mentan og list eru rík tilfeingi hjá eini og hvørji tjóð. Tað ræður tí um at tryggja og menna hetta tilfeingið, og kann hetta verða gjørt eitt nú við skilagóðum og miðvísum mentanarpolitikki á breiðum politiskum støði.

Altjóðagerðin og kunningar- og samskiftistøknin seta stór krøv til útbúgvingar- og mentanarpolitikk. Heimurin verður alt meira *ein* útbúgvingar- og listamarknaður. Vitan, listagávur og kreativitetur verða nógv eftirspurdir førleikar í framtíðini. Við álitinum *Føroyskur førleiki* frá 1999 hevur Mentamálastýrið roynt at slóða fyri nýggju krøvunum um vitan og útbúgving.

Við hesum áliti um mentanarpolitikk verður so roynt at slóða fyri teimum krøvum og teimum møguleikum, ið standa føroyskari mentan og list í boði í altjóðagjørda kunningarsamfelagnum. Tað er umráðandi ikki at fata nýggju rákini sum hóttanir, men heldur at síggja hesi rák sum avbjóðingar og møguleikar fyri føroyska mentan og list. Men tað er ikki nóg mikið at fata hesi nýggju rák sum bert avbjóðingar og møguleikar, tað er eisini neyðugt at bera so í bandi, at vit stýra menningini, so at tað ikki endar við, at menningin stýrir okkum. Tískil má viðurkennast, at ein ávísur vandi fyri føroyska mentan og samleika er til staðar í hesum rákinum.

Hesi viðurskifti hava elvt til, at mentanarpolitikkur og grundleggjandi mentanarligir spurningar eru meira aktuellir nú enn áður, og tykjast hesir spurningar eisini at hava størri samfelagsligan áhuga enn áður. Hetta er galdandi bæði úti sum heima.

Í altjóða høpi hava mentanarlig viðurskifti og mentanarlig rák seinastu 30-40 árini havt stóran almennan áhuga, sum tað sæst eitt nú av frágreiðingum frá UNESCO, frá Norðurlandaráðnum og Norðurlendska Ráðharrastovninum eins og frá teimum einstøku norðurlendsku mentamálaráðunum. Mentanarøkið er eisini eitt høgt raðfest samstarvsøki í ES og EBS høpi, og hevur hetta samstarv havt stóran týdning fyri mentanarlívið í viðkomandi limalondunum og í londum við EBS-avtalum.[1]

Sum dømi um tann stóra mentanaráhuga, sum hevur eyðkent almenna orðaskiftið í stórum pørtum av heiminum seinastu 30-40 árini, kann verða nevnt, at UNESCO á einari mentanarráðstevnu í Venezia í 1970 heitti á øll limalond um at styrkja mentanarøkið. Hetta varð gjørt við støði í trimum meginreglum, nevniliga:

1) ein virkin mentanarpolitikkur hevur positivar búskaparligar avleiðingar fyri alt samfelagið
2) økt mentarligt virksemi hevur stóran týdning fyri fólk í eini tíð við meiri frítíð, stórum broytingum á fjølmiðlaøkinum og teim lyndisbroytingum, ið stóðust av teimum ógvusligu samfelagsbroytingunum eftir annan heimsbardaga, og
3) ein virkin mentanarpolitikkur eigur at fatast sum ein íløga í tað einstaka menniskjað og sum ein íløga í støðið undir fólkaræði og størri frælsi.

Tann sera virkni og mennandi mentanarpolitikkurin, ið hevur verið rikin í Vesturevropa, serstakliga í Norðurlondum, hevur verið ávirkaður av áheitanini frá UNESCO.[2]

## 1.2.2. Mentanarpolitikkur – hví og fyri hvønn?

Hetta mentanarálit hevur sum fortreyt, at ein virkin mentanarpolitikkur fyrst og fremst gagnar føroyska samfelagnum og føroysku tjóðini. Í eini tíð, hvar lívsvirði og samleiki eru lyklahugtøk, er mentanin og atgongd almenningsins til góð og breið mentanartilboð ein fortreyt fyri andligum og tímiligum trivnaði. Ikki minni týðandi enn tilboð er *luttøka*. Av hesi orsøk skal mentanarpolitikkurin eisini eggja til virkna luttøku í mentanar- og listalívinum, og tí er neyðugt at fata

1 Eitt dømi er tann týdningur, EBS-avtalan og Nordisk Film- og TV fond hava fyri íslendska filmslist.
2 Vestheim, 1995, s. 172 ff.

mentan og mentanarlív í breiðari merking. Hetta merkir eisini, at dentur verður lagdur á yrkis- eins væl og áhugavirksemi.

Í teimum ógvisligu broytingum, sum tøknin, altjóðagerðin, altjóða fjølmiðlarnir, kunningartøknin og samskiftiskollveltingin bera við sær, tryggja mentan og list støðufesti og samleika. Mentanarpolitikkur er sostatt fyrst og fremst fyri borgararnar og ikki bert fyri listina.

Mál, fólkamentan, byggilist, mentanararvur og list mynda kjarnuinnihaldið í okkara mentan. Hesi hugtøk eru so at siga kjarnuøkini í okkara mentan – tey gera okkara mentan ríka, livandi, upplívandi, mennandi og ektaða. Hesi øki mugu røkjast, dyrkast, fjálgast má um tey og fram um alt: tey mugu mennast, um ikki mentan okkara skal stirvna og gerast ein fornlutur ella ein formur uttan livandi innihald. Fortreytir fyri skapandi virksemi mugu bøtast, tryggjast og mennast, og tað listaliga gávuríkidømið, ið er til staðar í fólkinum, eigur at fáa góðar og frælsar virkismøguleikar.

Mentanarpolitikkurin skal í fyrsta lagi tryggja hesa røkt og hesar møguleikar. Í øðrum lagi skal mentanarpolitikkurin vera við til at tryggja, at vit ikki missa mentan okkara í globaliseringini og altjóðagerðini. Vit skulu tvørturímóti megna at fóta okkum og gerast harrar yvir menningini, sum kemur inn yvir okkum, um vit skulu varðveita og menna okkara mentan og okkara føroyska samleika í altjóða meldrinum. Vit skulu við øðrum orðum verja okkum uttan at byrgja okkum inni.

## 1.2.3. Mentanarpolitikkur sum heild

Hvussu verður mentanarpolitikkur annars uppfataður í orðaskiftinum uttanlands eitt nú í Norðurlondum?[3] Tað ber til at eygleiða nøkur meginrák, tá tað ræður um at avmarka og nærri at lýsa hugtakið mentanarpolitikk. Seinni verður stutt komið nærri inn á ítøkiliga politikkin, sum hann hevur verið rikin í Norðurlondum tey síðstu tríati árini. Við teimum galdandi sjónarmiðunum og samfelagsliga orðaskiftinum í eitt nú Norðurlondum í baksýni ber til at siga, at *tvær* ymiskar meginregluligar áskoðanir eru galdandi, tá vit seta spurningin, hvat slag av mentanarpolitikki, fólkaræðilig lond eiga at reka.[4]

[3] Sí annars *Avmarkaðan marknað*, har mentanarhugtakið verður gjølla umrøtt.

[4] Henda lýsing av mentanarpolitiskum meginreglum byggir fyri tað mesta á Duelund 1995 og Vestheim 1995.

Onnur áskoðanin byggir á ta meginreglu, at øllum, listafólkum eins og stovnum, sum virka á mentanarøkinum, eigur at verða tryggjað so nógv frælsi sum møguligt, og dentur eigur at verða lagdur á margfaldni og smidleika. Henda meginregla nevnist *reglan um armslongd*. Hetta verður tulkað soleiðis, at listin og listaligt virksemi eiga í minsta lagi at vera eina *armslongd* frá politisku myndugleikunum, um listaliga frælsið skal verða tryggjað. Mentan og list eiga ikki at verða stýrd politiskt.

Henda meginregla var upprunaliga orðað av franska mentamálaráðharranum, heimskenda rithøvundanum, André Malraux, sum tosaði um *stuðul uttan uppílegging*. Danski mentamálaráðharrin Julius Bomholdt málbar seg soleiðis: *Tað almenna skal stuðla uttan at stýra*. Henda meginregla er í dag yvirhøvur alment viðurkend og galdandi í Norðurlondum.[5] Ofta hava mentamálaráðini og Norðurlendski Ráðharrastovnurin kortini puljur, ið kunnu nýtast á økjum, har politiski myndugleikin heldur tað vera rætt og neyðugt at gera serstøk tiltøk til gagns fyri mentan og list sum heild.

Hin áskoðanin tekur støði í einum heldur einstáttaðum sýni á mentanarpolitikkin. Henda áskoðan merkir vanliga meira almenna stýring og fastar karmar hjá teimum, sum virka á mentanarøkinum. Hesa meginreglu finna vit oftast í londum, ið líkjast frá Norðurlondum og Vesturevropa, tá hugsað verður um fólkaræðiligt stýrislag.

Uppaftur onnur lond hava ta meginreglu, at tað almenna als einki eigur at hava við mentan og list at gera. Her ræður mangan tann áskoðan, at hetta økið má dúva uppá privatan stuðul og vælvild frá stórum vinnufyritøkum eins væl og frá ríkum einstaklingum. Til ber at siga, at hesin politikkur er mentanarpolitikkur á marknaðarbúskaparligum støði. Norðurlond nýta ikki henda politikk av tí sannroynd, at marknaðurin fyri mentan og list er so avmarkaður, at ein slíkur politikkur hvørki kann tryggja listafólkum virkiskor ella borgarum tey dygdargóðu mentanartilboð, ið hoyra nútíðarsamfelagnum til. Tað er helst eisini ein sannroynd, at ein slíkur politikkur liggur rættiliga fjart frá norðurlendskum hugsanarhátti og norðurlendskari mentan.

Heildarmyndin av mentanarpolitikkinum tey seinastu 30-40 árini í Norðurlondum eins og í flestum vesturevropeiskum londum er yvir-

[5] Tað er ymiskt, hvussu meginreglan verður framd í verki. Oftast verður nýtt skipan við almennum grunnum, har umboð fyri mentanarøkið eru í meiriluta.

høvur tann, at grundsjónarmiðið um, at tað almenna skal stuðla uttan at stýra, er meginreglan. Til myndina hoyrir tó, at har talan er um stórar altjóða felagsskapir, tykist rákið at verða, at peningaligar veitingar til mentan og list í ávísan mun verða politiskt stýrdar.[6]

## 1.2.4. Mentan og mentanarhugtøk

Tað ber illa til at umrøða mentanarpolitikk uttan stutt at umrøða ymsar áskoðanir um sjálvt hugtakið mentan. Tí skal hetta hugtak vera eitt sindur nærri umrøtt her. Tað eigur í hesum viðfangi at verða havt í huga, at mentan og mentanarpolitikkur fevna um kenslur, hugtøk og virði, sum allir føroyingar eru felags um. Nakað, sum bindur okkum øll saman uttan mun til politiska áskoðan og átrúnaðarlig tilknýti. Men samstundis skerst ikki burtur, at talan er um eitt evni, ið nógvar meiningar eru um. Hetta álit er ein roynd at finna felagsnevnaran – at finna eitt felags gongulag við støði í eini søk, sum vit í stóran mun eru felags um, nevniliga okkara mentan og samleika.

Tað eru nógvar allýsingar av hugtakinum *mentan*, og sagt verður eitt sindur skemtandi, at tað eru til skjals 164 allýsingar av hugtaknum.[7] Ein tann elsta sigur, at mentan er *“hin samansetta heildin, ið umfatar kunnleika, átrúnað, list, moral, rættarkenslu, siðir og øll kynstur og vanar, menniskjan ognar sær sum limur í einum samfelagi”*.[8]

Støðið undir hesum áliti eru tríggjar rættiliga vanligar lýsingar av mentanarhugtakinum:[9]

1. Mentan sum virði og sum normar, har orðið mentan verður nýtt at lýsa ávís virði og ávísar normar sum t.d. ungdómsmentan, fólkamentan ella virkismentan. Í hesum týdningi kann heitið eisini verða nýtt um mentanina hjá eini tjóð, t.d. kunnu vit tala um føroyska mentan, íslendska mentan, danska mentan o.s.fr.

[6] Norðurlendska mentanarsamstarvið er skipað soleiðis, at Nordisk Kulturfond verður stýrdur av umboðum fyri NR og MR-K. Herumframt hava ráðharrarnir pulju til strategisk mentanartiltøk. Her ræður sostatt ikki reglan um armslongd. Harafturímóti eru í mentanarsamstarvinum listanevndir t.d. NORDBOK og NOMUS, ið ráðgeva MR-K, og játta hesar nevndir eisini pening til mentanarlig tiltøk. Hesin parturin av norðurlendska mentanarsamstarvinum byggir sostatt á meginregluna um armslongd.

[7] Sí t.d. *Avmarkaður marknaður* s. 25.

[8] *Avmarkaður marknaður* s. 24. Ein longri frágreiðing um ymiskar áskoðanir á hugtakið *mentan* er í *Avmarkaðum marknaði* s. 22 ff.

[9] Tað hevði borið væl til at nýtt aðrar lýsingar enn hesar.

2. Mentan sum sektorur, har hugtakið mentan verður nýtt at lýsa tað samfelagsøkið, ið elur fram mentan og list, eitt nú tónleik, sjónleik, film, myndlist, byggilist o.m.a.
3. Mentan sum list, har dygd og góðska eru avgerandi fyri, hvat ið er list, og hvat ið ikki er list.

Hetta álit snýr seg mest um tey viðurskifti, ið koma undir 2 og 3, t.v.s. mentan sum list og um listaligt virksemi, um listalig tilboð til borgararnar, um møguleikar hjá skapandi og útinnandi listafólkum at liva og virka í Føroyum og mentan sum samfelagsøki ella sektor.

Til tess at lýsa mentan sum sektor nærri, verður stundum nýtt mynd, ið lýsir samanhangið á hesum øki, sí mynd 1.

**Mynd 1.** Mentanarøkið

| | | |
|---|---|---|
| **LEIKLIST**<br>Sjónleikur, dansur, opera, songleikur | **LIST**<br>Myndlist, høggmyndlist, arkitekturur, formlist (design), listahandverk | **TÓNLEIKUR**<br>Poppur, rokkur, klassiskur, jassur, fólkatónleikur |
| **SAMANRENNING (Fusión)**<br>Margmiðlar, tvørgangandi tiltøk og verkætlanir | **MENTANARØKIÐ** | **MENTANARARVUR**<br>Fornminnissøvn, bygdasøvn, skjalasøvn, listasøvn |
| **FJØLMIÐLAR**<br>Útvarp, sjónvarp, bløðini | **FILMUR/VIDEO**<br>Spælifilmur, stutt- og dokumentarfilmur, musikkvideo v.m. | **BÓKMENTIR**<br>Fagrar bókmentir, fakbókm. tíðarrit |

Heimild: *Danmarks kreative potentiale, 2000*

Sum tað sæst av tí, sum er sagt frammanfyri, eru mentan og list ikki heilt tað sama. Kortini hugsa vit ivaleyst oftast um list og listaligt virksemi og ikki um alt mentanarøkið, tá vit tosa um mentan, nakað sum jú eisini eyðkennir hesa ætlan, sum í stóran mun snýr seg um skapandi og útinnandi list.

Í mentanarfrøðiligum bókmentum verður eisini umrødd ein onnur myndalig skipan við ymsum fláum, sí mynd 2. Endamálið við myndini er bert at vísa ymsar tættir í tí mentanarpolitikki, ið verður rikin í einum nútímans vælferðarsamfelagi.

**Mynd 2.** Mentanarhugtøk og almennar mentanaruppgávur




Heimild: Duelund 1995

Kanna vit eftir, í hvønn mun føroyskur mentanarpolitikkur røkkur um hesa mynd, sæst, at fláirnar 2-4 eru meira ella minni skipaðar við lógum og kunngerðum. Harafturímóti er fyrsta fláin bert í ávísan mun fevnd av aðrari lóggávu enn løgtingsfíggjarlógini, og tað er m.a. hetta økið, ið henda mentanarætlan er ætlað at bøta um.

Hetta álitið fevnir um eitt øki, ið higartil hevur verið rættiliga óskipað og undirfíggjað, og kanska ikki notið ta samfelagsligu viðurkenning, sum tað hevur uppiborið. Søguliga eru vit mentanarpolitiskt á sama støði, sum okkara grannalond vóru á í seksti- og sjeytiárunum. Hetta merkir ikki, at vit skulu gera somu royndir sum grannar okkara. Heldur eiga vit at fevna um alla gongdina og menningina innan mentanarpolitiska økið, taka so at siga ein skilagóðan gjøgnumskurð og burtur úr hesum skapa ein politikk, sum skal mynda hóskandi nútímans karmar um eitt blómandi listaumhvørvi og mentanarlív í Føroyum.

Tað ber ikki neyvt at skilja millum hesar 4 fláirnar. Tað er tí eyðsæð,

at ein mentanarpolitisk ætlan fyri listaøkið verður meira ella minni at nema við alt mentanarøkið, t.v.s. hesar 4 fláirnar.

## 1.2.5. Mentan og vinnulív

Mentanarframleiðsla kann gerast eitt vørumerki fyri føroyska dygd – bæði tá tað snýr seg um vinnuliga og listaliga framleiðslu. Framkomin lond hava skilt, at mentan og vinnulív kunnu ganga hond í hond, tá tað snýr seg um at umboða landsins virði úteftir. Her er hóskandi at minna á tað, sum víðagitni franski mentamálaráðharrin Jacques Lang hevur sagt, at íløgur í mentan vóru ikki bara at styrkja medvit og sjálvskenslu, tær vóru eisini besti handilsskapur, landið kundi gera. Tí fyri hvønn frank, tað almenna læt út, komu fýra ella fimm frankar afturat. Mentan var landsins størsta vinnugrein, tá ið alt varð tikið við, og mentan gav landinum andlit og virðing um allan heim. Hetta er væl at merkja ikki bert hent slagorð, hetta er prógvað við nógvum búskaparligum rannsóknum uttanlands.[10] Vit hava í Føroyum eitt talandi dømi: Í 1998 var upphæddin, sum Norðurlandahúsið rindaði í MVG-gjaldi, ájavnt við játtanina á løgtingsfíggjarlógini til Mentanargrunnin.

Henda áskoðan kemur greitt fram í frágreiðingum í okkara grannalondum, eitt nú í Danmark, har júst eru komnar út tvær frágreiðingar, har ymsir møguleikar fyri samstarvi millum mentan og vinnulív er útgreinaðir. Niðurstøðurnar eru, at mentan og list hava ikki bert stóran týdning fyri trivnað og samleika, men eisini fyri búskapin og vinnulívið.[11]

Áhugin uttanlands fyri samstarvi millum mentan og vinnulív er skjótt vaksandi. Stjórnir eru av álvara komnar eftir týdninginum av hesum samstarvi. Stórabretland, Finnland og Danmark eru á odda í hesi menning, og hesi lond hava ætlanir um at troyta teir møguleikar fyri menning og vøkstri, sum eru í sambandinum millum mentan og vinnulív. Í Stórabretlandi verður talað um *kreativan ídnað,* í Finnlandi nevnist hugtakið *mentanarídnaður,* ið er sama hugtak, sum UNESCO nýtir um hetta fyribrigdið. Í Danmark vórðu í 2000 hugtøkini *Den kreative alliance* og *Danmarks kreative potentiale* løgd sum støði und-

[10] Sí t.d. Langsted, Kulturøkonomi, 1990, Bille Hansen, Kulturens økonomiske betydning, 1993.

[11] Sí *Den kreative alliance,* 2000 og *Danmarks kreative potentiale,* 2000.

ir einum mentanarpolitikki, ið hevur sum aðalmál: at menna karmarnar fyri mentan og undirhaldi sum vinnugreinir.[12]

Málið við hesum vinnuvenda mentanarpolitikki er at skapa ein nýggjan felagsskap millum fyritøkur øðrumegin og mentanarøkið hinumegin kring marknaðarføring, menning, bygnaðarbroytingar, leiðslu- og starvsfólkamenning. Annað mál er at styrkja førleikarnar og at bøta um møguleikarnar hjá vinnufyritøkum at kappast um upplivingar og at gagnnýta serstøk tjóðskaparlig virði og mentanarligar førleikar til tess at økja um kappingarførið. Samantikið er ætlanin, at vinnufyritøkur skulu fáa betri atstøður at gagnnýta teir kreativu menningarmøguleikar, ið eru til taks í samfelagnum.

Bakstøðið fyri hesum nýggja og vinnuvenda mentanarpolitikkinum er sum ikki einaferð globaliseringin og altjóðagerðin. Um allan tann tøkniliga framkomna heimin hendir nú eitt skifti frá tjóðarbúskapi til globalbúskap, frá ídnaðar- og vitanarsamfelagi til upplivingarsamfelag. Samstundis við hetta búskaparliga umskiftið hendir eitt líðandi skifti frá gomlum virðishugtøkum, siðvenjum og autoritetum fram ímóti eini størri frígering av menniskjuni.

At vinnufyritøkur og vinnulívsfólk stuðla mentanarlívinum, er einki nýtt, og óneyðugt er at nevna nøvn í hesum sambandi. At mætir vinnulívsmenn seta á stovn grunnar til stuðul fyri vísindi og list hevur verið vanligt í øldir. Nú í tíðini er tað eisini vanligt, at vinnufyritøkur sponsorera mentan og list og ikki um at tala, ítróttina. Uttanlands hevur rákið í nøkur ár verið hetta, at fyritøkur alt meira taka upp samband við mentanarlívið, tí tað gagnar áhugamálunum hjá viðkomandi fyritøkum. Fyritøkur bjóða medarbeiðarunum við familjum listaligar upplivingar og hendingar, stuðla mentanarlívinum á staðnum, og hetta verður alt gjørt, tí fyritøkurnar vita, at tað gagnar teimum og teirra framleiðslu, um tær sýna ábyrgd mótvegis medarbeiðarum, umhvørvi og mentan. Fyritøkurnar koma í gott orð, og tað lønar seg so aftur bæði á ein og annan hátt. Hetta rák er meira enn so farið at bera við í Føroyum í seinastuni, og er tað ein áhugaverd gongd sæð frá einum mentanarpolitiskum sjónarhorni.

Hvør verður so gongdin framyvir, hvussu fer samanspælið millum vinnulív og mentan at forma seg í framtíðini? Fer samstarvið millum vinnulív og mentan av álvara at verða meira enn at sponsorera ella at keypa sýningar, myndlist, tónlist o.a.t.?

12 Hesin politikkur er útgreinaður í nevndu álitum frá 2000.

Kanningar og framskrivingar í okkara grannalondum vísa, at gongdin verður tann, at tað alt meira fer at renna saman millum mentan og vinnulív. Orsøkirnar eru mangar, og skulu vit bert nevna nakrar her. Ein grundleggjandi orsøk er, at sonevnd *bleyt virði*, eitt nú *kreativitetur* og *hugskotsríkidømi* fara at hava vaksandi týdning í framtíðini á øllum økjum og ikki minst í virkisbúskaparligum høpi. Væntandi er, at tann kreativitetur og tað hugflog, ið eyðkennir mentanarøkið, fer at breiða seg til innovatión og kappingarføri í vinnulívinum.[13]

Um sambandið millum mentan og vinnulív framhaldandi fer at økjast, fer tað at menna vinnulívið.[14] Men henda gongdin fer samstundis at geva listafólkum og mentanarstovnum nýggjar og ríkar møguleikar. Tað kundi væl hent, at hetta fór at gerast gongdin í Føroyum eins og í okkara grannalondum, tí vinnulívið gerst alt meira sundurgreinað, og nýggjar vinnugreinir taka seg upp. Tað er tí neyðugt, at tað í mentanarpolitikkinum verður lagt upp fyri hesum viðurskiftum. Hetta kundi eitt nú verið gjørt við, at tað almenna skapti neyðturviligar fortreytir fyri einum tættari sambandi millum mentan og vinnulív.[15] Hetta eigur at verða gjørt við neyðugum fyriliti fyri tí listaliga frælsinum. Tað, sum ber til í okkara grannalondum, ber eisini til hjá okkum, ja, tað skuldi enntá verið lættari at skipað eitt tílíkt samband, tí samfelagið er lítið og greitt at yvirskoða.

## 1.2.6. Nýggir miðlar, nýggj tøkni – netverksamfelagið

Nýggju digitalu miðlarnir eru í stórari og skjótari menning. Tað eigur tí í listapolitikkinum at verða lagt upp fyri listaligu nýtsluni av hesi nýggju tøknini og teimum møguleikum, sum eru til taks hjá listafólkum, ið hava hug og dirvi at royna nýggjar leiðir.

Víst kann í hesum sambandi verða til álitið *MentaNet* frá 2000, har mælt varð til at gera eitt mentanet fyri at gera tað lættari hjá stovnum, feløgum og fólki um teldutøknina at fáa atgongd til almennar mentanarstovnar og -tænastur. Mentanetið skal eisini kveikja áhugan fyri at luttaka í mentanarlívinum. Eitt mentanet kundi eisini verið hent í arbeiðnum at framflyta føroyska list innanlands sum uttanlands.

13 Den kreative alliance, 2000.

14 Danmarks kreative potentiale, 2000, s. 17.

15 Skipað kundi verið fyri seminarum, samstarvsnevndum og felags verkætlanum.

# 1.3. Føroyskar fortreytir

## 1.3.1. Mentanarpolitikkur í føroyskum søguligum baksýni

Eitt av aðalmálunum hjá tjóðskaparørsluni, og sum rættiliga breið semja í byrjanini var um á løgtingi, var at bjarga føroyskum máli og føroyskari mentan.

Tann mentanarpolitikkur, ið var rikin fyri annan heimsbardaga, snúði seg mest um at varðveita mentanararvin – málið, kvæðini, dansin, sagnir og ævintýr, staðarnøvn, forngripir og skjøl. Herumframt var fólkaupplýsing ein týðandi táttur. Hesin táttur var sermerktur við, at hann hevði røtur heilt aftur í 19. øld, tá menn fóru undir at stovna bókasavn.

Tá tjóðskaparrørslan blómaði og í árunum fram til annan heimsbardaga, var áhugin fyri mentanararvinum stórur millum tingmenn og í almenninginum yvirhøvur, og fleiri dømi eru um, at tingmenn taka mentanarpolitisk stig, sum mett við nútíðar eygum mugu viðurkennast sum framskygd, djørv og skilagóð tiltøk. Sum dømi um hetta mentanarliga medvit kunnu vit nevna løgtingsins strev fyri at fáa bygt nýggj hús til bókasavn, fornminnissavn og skjalasavn. Hetta strev byrjaði longu umleið 1905 og endaði við, at stásiligu húsini á Debesartrøð vórðu vígd í 1932. Tey kostaðu tá umleið 80.000 kr. Tað er torført at meta um henda prís í dagsins krónum, men búskaparfrøðingar siga hetta svara til 80-100 mió. kr. í dagsins peningavirði. Hetta var eitt ódnartak, ikki minst, tá hugsað verður um, at takið varð tikið, meðan versta búskaparkreppa í øldini var í hæddini. Onnur dømi eru, at løgtingið í 1904 forðaði fyri, at almennu skjølini vórðu flutt av landinum, at tingið játtaði pening til orðabókaarbeiði og savning av staðanøvnum, og løgtingið stuðlaði ungum fólki at fáa sær hægri útbúgving og listaútbúgving. Eisini kann verða víst á stovnsetingina av Føroya Studentaskúla og tingsins stuðul til Føroya Fólkaháskúla.

Sum heild kann afturlítandi staðfestast, at løgtingsins áhugi fyri mentan, skúlamálum og fólkaupplýsing í millumkrígstíðini fekk stóran týdning fyri menningina í Føroyum í hesum tíðarskeiði. Løgtingið fór rættiliga tíðliga at keypa føroyska myndlist, og eftir at heimastýrið varð sett á stovn í 1948, tók landsstýrið henda sið upp.

Við heimastýrislógini 1948 komu mentanarmál undir føroyskt lóg-

gávuvald og fyrisiting. Yvirtøkan av mentamálum fekk týdning fyri eitt nú varðveitingina av mentanararvinum. Nýggj og eftir tátíðar viðurskiftum tíðarhóskandi lóggáva varð samtykt fyri Landsbókasavn og Landsskjalasavn (1952), og somuleiðis varð lóg samtykt um friðing av fornminnum (1948) og um Føroya Fornminnissavn (1952), lóg um Føroya Náttúrugripasavn (1955)[16]. Henda lóggáva fekk sera stóran týdning fyri varðveitingina av mentanararvinum og fyri medvit manna fyri hesum týdningarmikla øki. Eisini gjørdist lóggávan ein fortreyt fyri útbygging og fyri menning av hesum stovnum, sum var frammarlaga fyri sína tíð, og sum fekk stóran týdning fyri mentan og samleika. Partar av hesi lóggávu eru endurskoðaðir og avloystir av nýggjum lógum, meðan aðrir partar enn eru í gildi mest sum óbroyttir. Nýtt og tíðarhóskandi Landsbókasavn varð bygt og tikið í nýtslu 1980, og bókasavnsvirksemið kring landið varð útbygt og økt.

Útvarp Føroya varð sett stovn í 1957, ein hending, hvørs týdningur fyri føroyskt mál og mentan ikki kann yvirmetast. Alment sjónvarp varð sett á stovn í 1984. Leingi var breið politisk semja um, at tað almenna skuldi hava einkarrætt at senda kringvarp í Føroyum. Men við løgtingslóg frá februar 1998 var henda meginregla broytt, loftmiðlaøkið varð liberaliserað og heimildin at játta sendiloyvi varð við nýggju kringvarpslógini latin eini loftmiðlanevnd, sum landsstýrismaðurin velur eftir ávísum meginreglum.

Yvirtøkan av málsøkinum *mentan* hevði við sær betur skipað viðurskifti á mentanarøkinum, og føroysk list fekk betri virkiskor. Henda framgongd var ofta tengd at virkseminum hjá áhugaðum fólkum og felagsskapum, ið við avmarkaðum almennum stuðli byrjaðu ymiskt mentanarligt og listaligt virksemi. Nevnast kunnu t.d. Listafelag Føroya, Rithøvundafelag Føroya, Havnar Sjónleikarafelag og Tórshavnar Musikkskúli. Tá Listasavn Føroya varð bygt, var hetta eitt úrslit av einum longum strevi hjá Listafelagi Føroya, og uppgávan varð loyst við samstarvi millum hetta felag, Føroya Landsstýri og danskar grunnar.

Mentanargrunnurin, ið var stovnaður í 1946 og munandi mentur undir heimastýrinum, er tað einstaka mentanarpolitiska tiltakið, ið hevur gagnað føroyskum bókmentum mest.

Í fimmtiárunum vaks eisini áhugin fyri vísindum og gransking. Stovnanin av Fróðskaparfelagnum og seinni Fróðskaparsetrinum eru dømi um henda áhuga og um ta politisku undirtøku, ið var fyri hes-

[16] Henda lóggáva er mestsum øll seinni broytt og nútímansgjørd.

um spurningum. Hesir stovnar vóru í byrjanini nógv tengdir at spurninginum um føroyskt málstrev. Føroyskt mál, føroysk málfrøði, bókmentafrøði og fólkamentan vóru leingi einastu verkevni á setrinum. Seinni varð stovnurin útbygdur við megindeildum fyri náttúruvísindi og søgu- og samfelagsvísindi.

Men yvirtøkan av málsøkinum mentan førdi ikki til nakran skipaðan og miðvísan mentanarpolitikk, tá talan var um *skapandi* og *útinnandi list*, hóast konti á fíggjarlógini bóru hesi heiti. Harafturímóti var sjálvsagt meira ella minni tilvitað rikin eitt slag av mentanarpolitikki, ið mest kom til sjóndar í ávísum stuðulsjáttanum á figgjarlógunum. Hesin politikkur sýndi seg eisini við teimum íløgum, ið vóru gjørdar á mentanarøkinum og sjálvandi eisini við teimum íløgum, ið ikki vóru gjørdar.

Tað er eyðsýnt, at áhugi hins almenna síðan heimastýrislógina hevur verið skiftandi frá listagrein til listagrein. Hetta sæst eitt nú av, at leiklistin ikki kemur á løgtingsfíggjarlógina fyrr enn í 1989. So kundi verið spurt, um hetta skal tulkast soleiðis, at ikki fyrr enn í 1989 verður henda – ein tann elsta listagrein í heiminum eins og í Føroyum – alment viðurkend sum list. Ella kundi verið spurt, um talan als ikki er um, at leiklistin tilvitað verður sett uttanfyri, men at talan heldur er um tilvild – um ta tilvild, sum í stóran mun tykist at hava verið galdandi fyri umsitingina av tí partinum av hesum málsøki, sum fevnir um skapandi og útinnandi list.

Okkurt kundi bent á, at stuðulin á løgtingsfíggjarlógunum til ávísar listagreinir er úrslit av dugnaligum lobbyvirksemi hjá ávísum felagsskapum. Hesum er einki ódámligt í, og hetta er einki serføroyskt fyribrigdi, men nakað, sum er væl kent og alment viðurkent í útheiminum. Kortini er henda støða ikki nøktandi í nútímans samfelagnum, og ein ávís misnøgd við skipanina merkist í mentanarlívinum sum heild. Støðan sømir seg ikki mentaðari tjóð. Vit kunnu ikki bjóða okkara listafólki hesi ósømiligu arbeiðs- og livikor, og vit kunnu ikki fara víðari í nýggju øldini uttan at bøta um mentanarligu tilboðini til Føroya fólk – tað veri seg í dygd so væl sum í nøgd.

Tað er neyvan nakar sum ivast í, hvønn týdning mentan og list hava fyri føroyskan samleika. Men líta vit enn einaferð stutt aftureftir, so slepst valla undan at staðfesta, at tann politikkur, ið hevur verið rikin, ikki til fulnar hevur megnað at lýsa fyri brúkarum, í Føroyum eins væl og uttanlands, hvønn týdning, list og mentan hava fyri samleika okkara sum tjóð, og hvørji virði tey í sjálvum sær umboða – bæði

ítøkiliga sum vøra og sum ímyndan av listaligum virðum burturav. Hesin politikkur hevur heldur ikki givið skapandi og útinnandi list optimal arbeiðskor.

Tað er neyðugt at gera vart við hetta. Tí tað liggja stór og ótroytt virði í føroyskari mentan, í lista- og mentanarframleiðslu, sum vit í tí dagliga ikki geva okkum far um. Her eiga landsins myndugleikar at ganga á odda og skipa fyri, at okkara mentanar- og listaframleiðsla fær tær sømdir, sum hon hevur uppiborið – og ta viðurkenning, sum hon eigur at hava, fyrst av øllum her í Føroyum og síðani í útlondum.

Samanumtikið og við fyrivarni kann um mentanarligu og listaligu støðuna síðan 1948 verða sagt, at partar av listaliga virkseminum gerast alt meira yrkisligir. Hetta er serstakliga galdandi fyri myndlistina, leiklistina og tónlistina. Men tað tilfar, ið lýsir støðuna á økinum, eitt nú *Avmarkaður marknaður*, vísir eisini, at yrkisgerðin av listini bert partvíst er úrslit av einum miðvísum politikki. Heldur er hetta eitt úrslit av øktum medviti hjá listafólki eins væl og hjá almenninginum. Av sama tilfari gongur samstundis klárt fram, at illa hevur borið til hjá yrkislærdum listafólkum at liva av listaligari framleiðslu. Henda støða vísti, at samfelagnum tørvaði ein miðvísan mentanarpolitikk. Roynt varð at bøta um hesa støðu við *Avmarkaðum marknaði*. Orð vórðu sett á nógv viðurskifti og fyribrigdi, ið almenningurin ikki áður hevði givið gætur. Men bert fá av uppskotunum vórðu sett í verk.

## 1.3.2. Mentan og samfelag

Í mong hundrað ár hevur mentanin og tað, sum er skapað ella framleitt innan mentan og list, verið viðurkendur lutur av samfelagsins virksemi, og bæði fornfrøðin og søgan veita prógv um, at so er og hevur verið – bæði í londum, sum eru okkum lutfalsliga nær og í fjarlagnum mentanarøkjum sum t.d. India, Kina, Japan og Suðuramerika. Mentanarframleiðslan hevur her havt samband við tað, sum íbúgvarnir hava ímyndað sær um tað vakra, átrúnaðin, tað hugmyndafrøðiliga, tað dagliga virkið, lívið og ævinleikan – og listina sjálva sum umboð fyri hægstu kenslur, hugsanir og tráan menniskjans.

Í menniskjanum eru evni at skapa nakað hugmyndaligt, og tað eru júst hesi evni, sum seta munin millum menniskjað og aðrar livandi verur. Evnini at skapa list og mentan, sum ímynd fyri hægri andlig virði, eru bert fallin mannaættini í lut, og tann, ið átti hesi evni, hevur altíð verið høgt í metum í samfelagi sínum. Sum dømi um hetta

kunnu vit nevna ta virðing, honum var fyri í gomlum døgum, sum hevði fingið skaldagávuna í sín lut, og við orðasnildi og -leiki megnaði at geva hugsan síni form. Onnur dømi eru listahandverkarar, bátasmiðir, væl kendir í føroyskari mentanar- og siðsøgu, og í øðrum londum: listamálarar, tónleikarar, rithøvundar, arkitektar og onnur, sum gjøgnum øldirnar hava ávirkað samfelagið, flutt mørkini og ruddað slóð fyri nýhugsan og framburði.

Taka vit nú føroyska mentan, so vita vit, at eitt nú skaldskapur av mannamunni og ávís listahandverk eru nærum eins gomul og tjóðin sjálv. Mentanartættir, sum eru komnir fram seinni hjá okkum eru t.d. ljóðføristónleikur og sjónleikur og skrivaðar bókmentir. Enn seinni hava málningalistin og popptónleikurin gjørt seg galdandi, og seinastu árini er klassiskur tónleikur framførdur av kønum fólki, eins og Føroyar eiga klassisk tónaskald á sera høgum dygdarstøði. Millum tey listaøki, sum blómaðu, kunnu serstakliga bókmentir verða nevndar. Mong dømi afturat kundu verið nevnd um hetta stóra og týðandi økið, sum føroyingar átóku sær at umsita beinanvegin, tá heimastýrislógin var komin í gildi.

Vit kunnu fáa íblástur frá tí mentanarpolitikki, sum rikin hevur verið í hinum Norðurlondunum, um vit samstundis tryggja okkum, at føroyskur mentanarpolitikkur tekur støði í føroyska samfelagnum og siðbundnum føroyskum mentanarviðurskiftum.

Tey tilmæli og hugskot, sum verða løgd fram í hesum áliti, eru partvís sprottin úr norðurlendskum mentanarpolitikki, partvís úr mentanarálitinum *Avmarkaður marknaður* og partvís úr teimum royndum, sum landsstýrismenn og fyrisiting hava nomið gjøgnum árini, eitt nú í orðaskifti við skapandi og útinnandi listafólk.

Eisini eigur í hesum sambandi at verða nevnt, at tann miðvísi og virkni mentanarpolitikkurin, sum hevur verið rikin í Norðurlondum og víða hvar í Vesturevropa, hevur verið til gagns fyri skapandi og útinnandi listafólk, fyri leiklist, filmsframleiðslu og fyri varðveiting av mentanararvinum og fyri borgararnar.

Tá ið tað frammanfyri er nevnt, at tað almenna ikki eigur at stýra mentanarframleiðslu og list, so eigur tað samstundis at verða gjørt vart við, at ein tílík stýring heldur ikki letur seg fremja í verki, um listin skal vera ektað og dygdargóð, tí listin sprettur fram í huga og sinni einstaklingsins – ofta í andsøgn til galdandi samfelagsligar viðtøkur og siðvenjur. Tað er júst tí ofta so, at mentan og list leggja lunn-

ar undir nýhugsan og nýggjar leiðir í samfelagsgongdini, og hetta kann so aftur elva til framburð á mongum samfelagsligum økjum. Alt hetta er væl kent frá søguni.

Harafturímóti eigur tað almenna at stuðla mentanarligum og listaligum tiltøkum og fyribrigdum og bera so í bandi, at tey fólk, sum virkin eru á hesum økjum, fáa fíggjarligar umstøður at gera tað verk, ið hugur, evni og sannføring teirra seta teimum sum lívsmið. Verk teirra mega virðast á eins høgum støði og øll tann samfelagsliga framleiðslan, sum tryggjar grundarlagið undir tilveru okkara sum tjóð, sum umboðar eina mentan, sum partvís er runnin av eini felags norðurlendskari rót, men sum hevur fingið sín serliga dám og form gjøgnum mangar øldir í hesum landi.

Síðani landnámstíðina hava føroyingar ment tann livihátt og ta lívsáskoðan og fjálgað um tey lívsvirði, sum til henda dag hava myndað samleika føroyinga. Einki av hesum er grógvið tilvildarliga fram. Tað er vorðið til í samspæli millum menniskjað og náttúruna. Menniskjað hevur lagað seg eftir hesum viðurskiftum og við snildi og hógv vunnið á náttúrugivnum trupulleikum. Sum dømi um hetta seinasta kunnu vit nevna *útróðrarmentan* okkara. Her tosa vit um handliga og verkliga mentan, ið var styrkt av andsmentan, sum varð nomin úr átrúnaðarligum virðum eins væl og miðaldarbókmentunum og skaldskapinum av mannamunni. Sama er at siga um bjargamentanina og lív føroyinga í bø og haga. Verklig mentan og andsmentan fylgdust í hugaheimi teirra, og hesir báðir samleikaformar hoyrdu saman og stuðlaðu og mentu hvør annan.

Tíðir broytast. Samfelagsformar og hugsjónir fara í søguna. Kvøldsetumentanin er ikki til longur. Føroyska samfelagið gjørdist meira opið fyri umheiminum bæði í vinnuligum, fíggjarligum og mentanarligum týdningi. Hetta fjøltáttaða útlendska árinið bar í sær avbjóðingar til aldagamla føroyska mentan – bæði í verkligum og andligum týdningi; men hetta fekk ikki tær avleiðingar, at gomul føroysk mentanarvirði gingu til grundar. Heldur yvirlivdu tey í broyttum líki í eini menning, sum í mongum føri stóð í andsøgn til nýtt rák, og sum í dualistiskari kapping fingu tað skap og snið, sum fjøltáttaðu mentanarformar okkara hava í dag.

Mentanararvur okkara er tryggjaður okkum í máli, skaldskapi á mannamunni, í staðanøvnum, sagnum, ævintýrum, bátasmíði, fornum húsasmíði og fólkamentan sum heild, list, tónleiki, sjónleiki og – ikki minst – í skrivaða orðinum: bókmentum okkara.

Føroyska samfelagið er soleiðis vorðið, at tað eigur at vera pláss fyri yrkislist eins væl og áhugalist. Føroyskur mentanarpolitikkur eigur at tryggja karmar og fortreytir fyri einum fruktagóðum samstarvi millum yrkislist og áhugalist. Báðar listir eru fortreytir hvør fyri aðrari. Felagsskapir og listagreinir eiga at samstarva tvørtur um mørk. Stavnhaldið má vera, at øll við áhuga og gávum skulu kunna vera við í mentanarligum og listaligum virksemi. Tað er neyðugt at tryggja útbúgving og skúling, og nýggjar royndir eiga at fáa rúmar ræsir, tí hetta er hjartablóðið í allari skapan.

Hesi sjónarmið eru galdandi fyri allar mentanar- og listagreinir okkara og kunnu standa sum yvirskrift yvir allarari skapandi list og týdningi hennara fyri samfelagið og tann einstaka, tað veri seg orðlist, leiklist, tónlist, byggilist ella myndlist, og sjálvandi er hetta eisini galdandi fyri varðveittu mentanina, bæði ta andligu og ta handligu.

## 1.3.3. Mentan og olja

Tað má ásannast, at tørvur ivaleyst er á ávísum málrættaðum mentanarligum tiltøkum í sambandi við, at Føroyar møguliga gerast eitt oljuland. Tørvur verður á greiningum av føroyska mentanarumhvørvinum, av støðuni hjá máli og mentan, støðuni hjá list og listafólkum, mentanarligu støðuni hjá børnum og ungum og fólkinum sum heild. Ásannast má samstundis, at tørvur er á einari mentanarligari ætlan at seta í verk, um Føroyar gerast oljuland. Tað eigur tí at verða sett ein nevnd ella arbeiðsbólkur av serfrøðingum og leikfólki at greina allan henda spurning og koma við uppskotum um eina neyðturviliga ætlan. Tað er eyðsæð, at ein tílík ætlan skal fevna bæði um mentan og list og tær útbúgvingarligu avleiðingar, ið standast av eini føroyskari oljuvinnu. Hetta vil við øðrum orðum siga, at tað er neyðugt at kanna, hvørji krøv, ið tann nýggja støðan setir til mentanarpolitikkin.

Ein annar spurningur er, hvønn fíggjarligan týdning, ein oljuvinna kann hava fyri mentanarlívið. Tað hevur fleiri ferðir verið umrøtt í Mentamálastýrinum, at Mentamálastýrið átti at sett fram krav á røttum stað, um at avkast frá oljuvinnuni skal koma mentan og list til góðar. Men meira hevur ikki verið gjørt við hendan spurningin. Mentamálastýrið hevur havt ta áskoðan, at mentanarpolitikkur er okkara ábyrgd, og eiga føroyingar sjálvir at rinda fyri henda politikk, so at hann ikki er heftur av einum møguligum avkasti frá oljuvinnuni. Hinvegin skerst ikki burtur, at verða Føroyar oljuland, so koma stórar peningaupphæddir í føroyskar grunnar. Tað eigur tí at verða

borið soleiðis í bandi, at ein hóskandi partur av oljuavkastinum kemur mentanarlívinum til góðar.

Hetta kann gerast á mangan hátt eitt nú við at tað politiskt verður tikin avgerð um, at ein ávísur partur av oljuavkastinum verður settur í Mentanargrunn Landsins, soleiðis at hann fær eitt stovnsfæ, ið veruliga munar.

# 1.4. Mentanarpolitikkur í Norðurlondum[17]

## 1.4.1. Mentanarpolitikkur sum partur av vælferðarsamfelagnum

Eftir seinna heimsbardaga hendu stórar samfelagsligar broytingar í Norðurlondum, sum m.a. bóru við sær tann samfelagsformin, vit vanliga nevna vælferðarsamfelagið. Eitt eyðkenni við hesi menning var, at javnrættindahugtakið í stóran mun myndaði politisku hugsanina um tilboð samfelagsins til borgararnar. Hetta var serstakliga galdandi á útbúgvingarøkinum og bar við sær, at nevnda øki varð demokratiserað. Stórir samfelagsbólkar fingu nú høvi at nema hægri framhaldsútbúgvingar, sum áður høvdu verið tilskilaðar fólki, ið vóru fíggjarliga væl fyri.

Í samsvari við hesa samfelagsmenning var næsta stigið í samfelagsligu menningini ein demokratisering av mentanarpolitikkinum. Hetta var ein menning, sum annars hevði djúpar røtur í evropeiskari og norðurlendskari søgu og siðsøgu, men í nýggjari tíð sýndi hon seg ítøkiliga við, at Norðurlond í umleið 1960 hvørt í sínum lagi tóku politisk stig til at orða nýggjan og tíðarhóskandi mentanarpolitikk.

Norðurlond hava síðani rikið ein virknan og livandi mentanarpolitikk, sum støðugt er broyttur og dagførdur samsvarandi broyttum fortreytum og skiftandi samfelagsligum viðurskiftum. Mentanarpolitiska rákið í Norðurlondum frá umleið 1960 og fram til dagin í dag kann í høvuðsheitum býtast í trý skeið, sum, hvat mentanarpolitikkinum viðvíkur, fevna um ymisk politisk og hugsjónarlig grundsjónarmið:

Í fyrsta tíðarskeiðinum, frá umleið 1960 til umleið 1970, verður vanliga tosað um *demokratiseringina* av mentanini. Í hesum sambandi verður lagdur dentur á mentanina, sum upplýsing um og útbreiðsla av list til so mangar av samfelagsins limum sum gjørligt. Mentanarpolitikkurin varð ein partur av yvirskipaðu politisku royndunum at demokratisera samfelagið, og mentanarpolitikkurin tók støði í somu meginreglum og virðum, sum vóru galdandi fyri uppbyggingina av vælferðarsamfelagnum annars. Listin var frammarlaga í hesum mentanarpolitikki, og hugsanin var, at listin átti at vera fræls og fyri øll.

[17] Henda lýsing er skrivað við støði í Duelund, *Den danske kulturmodel*, 1995 og Vestheim, *Kulturpolitik i det moderne Norge*, 1995.

Lyklahugtøkini vóru:
- upplýsing
- stuðul til listafólk og framleiðslu av listaverkum
- útbreiðsla av mentan
- miðfirring
- landsfevnandi mentanartilboð
- mentan fyri øll.

Í øðrum tíðarskeiðinum, umleið 1970 til umleið 1980, ber til at tosa um *mentanarligt demokrati,* tí fatanin av hugtakinum mentan verður víðkað til at fevna um mangt annað enn list. Nú varð farið burtur frá teirri áskoðan, at tað í samfelagnum bert var *ein* mentan, sum øll vóru felags um. Heldur var áskoðanin tann, at í einum og hvørjum samfelagi komu nógvir ymiskir mentanarformar til sjóndar – ella mentanarfláir, sum allar høvdu sama virði.

Áskoðanin um, at myndugleikarnir so at siga skuldu nýta mentanarpolitikkin at uppala fólk til at sýna áhuga fyri og hava tokka til listina, var meira ella minni slept. Hesin nýggi politikkur varð tilevnaður undir ávirkan av, at londini í Vesturevropa, orsakað av teimum mongu innflytarunum úr fremmandum londum, gjørdust støðugt meira fjølmentað. Henda broyting í mentanarpolitiska hugrákinum hevði so aftur samband við ta mentanarligu demokratiseringina, sum hevði verið ávegis síðan á leið 1960, og sum hevði avdúkað, at tað uppalandi mentanarhugtakið ikki hevði virkað sum tilætlað – m.a. tí, at tað snúði seg ov nógv um siðbundnu ímyndingina av sonevndu "fínmentanini". Í staðin fóru fólk nú at tosa um *mentanarpluralismu,* sum er tað hugtakið, at eingin heildarmentan ræður í samfelagnum, tí har eru heldur fleiri andligar stevnur, fleiri sløg av morali og átrúnaði, fleiri atferðarmynstur, o.s.fr. Men hetta rákið var eisini eitt úrslit av tí politikki, ið UNESCO og Evroparáðið høvdu mælt til, og hevði hesin politikkur í flestu vestur- og norðurevropeiskum londum felags eyðkenni.

Í samfelagsligum høpi var hesin nýggi mentanarpolitikkurin ivaleyst eisini komin av teimum stóru broytingum, ið hendu á kunningar, fjølmiðla- og samskiftisøkinum. Allar norðurlendsku stjórnirnar skiltu, at hesar broytingar kravdu ein endurskoðaðan og nógv meira virknan mentanarpolitikk.[18]

[18] Vestheim, 1995 s. 172 ff.

Lyklahugtøk vóru nú, at:

- valla ber til at tosa um *eina* mentan, sum øll eru felags um, heldur fevnir samfelagið um fleiri partsmentanir, ið koma til sjóndar á ymiskan hátt
- samfelagið gerst alt meira fjøltáttað í mentanarligari merking
- neyðugt er at fata mentanina sum eina menning og ikki óbroytandi ella endaliga liðugt
- mentan kann skiljast sum *áhaldandi luttøka* í samfelagsins menning
- støðugt meira dentur verður lagdur á áhugavirksemi og mentanarvirksemi hjá áhugabólkum og -feløgum.

Í triðja tíðarskeiðinum, ið byrjar umleið 1990, hevur mentanin í vaksandi mun fingið dám av at vera uppfatað ella sæð sum *sosialpolitiskt* og *búskaparligt amboð*, og sagt hevur verið um hetta rák, at listin og mentanin eru vorðin nýtt sum amboð, júst tí at mentanarpolitisk tiltøk í stóran mun verða framd av sosialpolitiskum og búskaparligum orsøkum. Hetta merkir so aftur, at mentanarpolitikkurin í stóran mun var ávirkaður av og hevði samband við rikna kreppupolitikkin og tær kreppuloysnir, sum myndugleikarnir hildu vera neyðugar at seta í verk. Samstundis er mentanarpolitikkurin eisini ávirkaður av, at skandinavisku londini í hesi tíð gjørdust alt meira fjølmentað, fjøletnisk og fjølátrúnaðarlig.

Um tikið verður saman um, ber til við fyrivarni at siga, at aðalendamálini við norðurlendskum mentanarpolitikki frá sekstiárunum og fram til dagin í dag hava verið hesi:

- Fíggjarligur stuðul til listafólk, upplýsing og útbreiðsla av list eru høvuðsmál, sum skulu skiljast sum verja ímóti ídnaðarmentanini
- Hesin politikkur verður síðani útbygdur, og áhugalistavirksemi, luttøka og miðfirring verða høvuðsevni í mentanarpolitikkinum
- Í nítiárunum broytist áskoðanin aftur, og mentanarpolitikkurin gerst alt meira eitt sosialpolitiskt og búskaparligt amboð.

Tað er eyðvitað, at vit ikki uttan víðari kunnu eftirgera tann sama mentanarpolitkk, sum okkara grannalond hava rikið tey seinastu umleið 40 árini, tí hóast londini eru lík, so eru samfelagsligu fortreytirnar ymiskar. Men vit kunnu beinleiðis flyta partar av norðurlendskum mentanarpolitikki til føroysk viðurskifti. Í ávísum førum kunnu vit fáa íblástur og hugskot, og aftur í øðrum førum eiga vit at finna okkara egnu loysnir og myndlar.

# MENTANARPOLITIKKUR

## Menningarætlan fyri skapandi og útinnandi list 2002-2006

# 2.1. Endamál, innihald og verkseting

## 2.1.1. Mál

Endamálið við hesari mentanarpolitisku ætlanini er:

- at tryggja best møguligu fortreytir fyri einum ríkum og fjølbroyttum mentanarlívi í Føroyum
- at skapa góðar, tryggar og mennandi karmar um skapandi og útinnandi list í Føroyum, tað veri seg yrkislist so væl sum áhugalist innan allar listagreinir
- at menna møguleikarnar fyri nýskapandi mentan og list í Føroyum
- at skapa størri fatan fyri tí týdningi, mentan og list hava fyri menniskju, samfelag og samleika
- at menna tolsemi og virðing millum manna
- at skapa størri fatan fyri tí týdningi, mentan og list hava fyri búskapin, og
- at skapa karmar fyri at framflyta føroyska list innan- og uttanlands.

## 2.1.2. Innihald

Karmarnir um mentan og list eiga at verða soleiðis háttaðir, at teir:

- tryggja eitt økt, breitt og dygdargott listaligt tilboð til øll uttan mun til inntøkur ella bústað í landinum
- stimbra og menna mentanar- og listaumhvørvið í Føroyum
- tryggja áhaldandi listaliga menning
- tryggja og eggja listaligari skapan og margfaldni
- útvega og tryggja listafólki sømilig og mennandi arbeiðskor
- tryggja listafólki listaligt so væl sum búskaparligt frælsi
- tryggja øllum listafólki at virka listaliga, uttan mun til um tey eru yrkislistafólk ella áhugalistafólk
- bøta um umstøðurnar hjá teimum, sum starvast í mentanarlívinum innan skapandi og útinnandi list í Føroyum
- geva rásarúm fyri yrkislist so væl sum fyri áhugalist
- eggja til meira mentanarligt virksemi í sjálvbodnum felagsskapum
- eggja til luttøku hjá lokalsamfelagnum í mentanarlívinum
- framflyta føroyska list uttanlands
- eggja føroyskum yrkislistafólkum at taka lut í altjóða mentanar-

samstarvi og bøta um møguleikar teirra at vera uppi í samstarvinum
- eggja sjálvbodnum føroyskum felagsskapum, ið virka við fólkamentan, at taka lut í norðurlendskum samstarvi og
- skapa fortreytir fyri einum fruktagóðum samstarvi millum mentanarlív og vinnulív.

Hesum málum kann bert røkkast við einum miðvísum, fjøltáttaðum og ítøkiligum mentanar- og listapolitikki og við at taka avgerð um, hvussu hesin politikkur eigur at verða settur í verk og at leggja eina tíðarætlan fyri íverksetingina við kostnaðarmetingum fyri ætlanarskeiðið. Men íverksetingin eigur eisini støðugt at endurskoðast í samráð við umboð fyri mentanarlívið, eitt nú við tey listaráð og tað mentanarráð, sum eru í uppskoti í hesi ætlan. Í seinasta lagi 2006 eigur øll ætlanin at verða eftirmett við støði í teimum málum, ið vóru sett í 2002 við atliti at eini møguligari nýggjari 5 ára mentanarpolitiskari ætlan ella møguliga einihvørjari heilt aðrari og betri ætlan. Tað eigur at gerast vart við, at tær upphæddir, ið eru skotnar upp í hesum riti, eru minstamát fyri at røkkast kann teimum settu málunum.

## 2.1.3. Ítøkilig tiltøk

Verður hesin politikkur settur í verk, verður neyðugt at endurskoða allar stuðulskipanir á mentanarøkinum. Tað verður eisini neyðugt at gera bygnaðarbroytingar á økinum. Ein partur av hesum broytingum kann gerast fyrisitingarliga, meðan aðrar broytingar krevja nýggja lóggávu ella broytingar í verandi lóggávu. Tað er ikki neyðugt at gera allar broytingar í senn, men allar eiga at verða gjørdar og royndarkoyrdar í ætlanarskeiðinum, t.v.s. fyri 2006.

Ein onnur týðandi fortreyt fyri, at henda ætlan skal eydnast, er, at hon fær breiða undirtøku millum flokkarnar á tingi so væl sum frá teimum felagsskapum og stovnum, sum umboða mentanarlív og listafólk.

Hesin politikkur kemur at kosta landskassanum meira pening enn tær játtanir, ið nú eru til taks til mentan og list. Spurningurin, hvussu stór játtanin til mentanarøkið sum heild og serstakliga til listaøkið skal verða í framtíðini, er politiskur spurningur. Eitt mát kundi verið at rokkið somu upphæddum sum í grannalondunum, men her er torført at gera samanberingar, tí kommunur, amt, fylki og len hava stóran fíggjarligan leiklut í hesum londum. Sostatt er meira peningur í

skipanum teirra enn tað, sum sæst av fíggjarlógunum í teimum einstøku Norðurlondunum. Aftur at hesum kemur, at mentanarlívið í okkara grannalondum hevur møguleikar at søkja fíggjarligan stuðul frá ES-grunnum og hartil fær dyggan stuðul frá peningasterkum privatum grunnum, vinnulívsfyritøkum og einstaklingum.

Ymiskt bendir á, at økja vit við støði í fíggjarárinum 2002 játtanarkarmin fyri Mentanargrunn Landsins og Leikpall Føroya við umleið 30% árliga og aðrar játtanir við umleið 10% árliga fram til og við fíggjarárinum 2006, so fara vit at nærkast støðinum í okkara grannalondum.[19]

Tað er umráðandi at fáa til vega breiða politiska semju um mál, innihald og játtanarkarmar fyri eitt 4-5 ára tíðarskeið, soleiðis at øll hava vissu fyri, at politikkurin ikki skiftir við møguliga skiftandi politiskum meirlutum á løgtingi og í landsstýri.

Alt bendir á, at Vinnuframagrunnurin fer at stuðla úflutningi av føroyskari mentanarframleiðslu, eitt nú av føroyskum tónleiki. Hetta er ein sera positiv gongd, sum kann mynda støðið undir einum samstarvi millum Vinnumálastýrið og Mentamálastýrið um menning av føroyskari mentanarframleiðslu.

## 2.1.4. Samstarv millum land og kommunur

Eitt týðandi mál í nýggja mentanarpolitikkinum er at geva øllum borgarum eitt betri mentanarligt tilboð, uttan mun til, hvar í landinum, teir búgva. Somuleiðis er tað umráðandi, at lista- og mentafólk fáa betri umstøður at skapa list og at arbeiða á mentanarøkinum uttan mun til, hvar tey búgva. Tað er tí ein týðandi fortreyt, at skaptir verða karmar um eitt samstarv millum Mentamálastýrið og kommunalar myndugleikar. Sum nevnt frammanfyri hava grannar okkara stakgóðar royndir við, at land og kommunur samstarva um mentanarpolitikkin.

Sostatt er tað eisini ein týðandi fortreyt fyri mentanarpolitikkinum, at hann fær undirtøku í lokalsamfelagnum, ið skal njóta gott av politikkinum. Tað er ikki nóg mikið, at kommunurnar taka størri fíggjarliga medábyrgd av mentanarlívinum. Tað verður eisini neyðugt, at fólkið, felagsskapir og stovnar í lokalsamfelagnum sýna fyritaksemi

[19] Talan er her bert um partin hjá statskassunum í grannalondum okkara.

og áræði, tá tað ræður um at útvega dygdargóð mentanarlig og listalig tilboð til samfelagið uttan fyri miðstaðarøkið. Eisini er neyðugt, at fólk gerast virkin og áhugaðir luttakarar í einum vónandi meira livandi og mennandi mentanarlívi. Ein orsøk til at royna ein meira uppsøkjandi og landsdekkandi mentanarpolitikk er, at hesin politikkur skal eggja okkum øllum at gerast meira virkin og nýta tey skapandi evni og tað hugflog, sum býr í øllum menniskjum. Tað finst í dag eitt stórt tilboð av frítíðarvirksemi innan kvøldskúlaskipanina. Hetta virksemi kundi verðið økt við nýggjum mentanarligum og listaligum tilboðum.

Henda síðan av málinum krevur, at vit eiga at líta at fysisku karmunum rundan um mentanarlívið í lokalsamfelagnum. Bygdahús ella skúlar eiga at verða gjørd til veruligar mentanardeplar við øllum nútímans hentleikum at mynda støðið undir einum virknari mentanarlívi. Hetta fer at bøta um trivnaðin í lokalsamfelagnum og samstundis at skapa fortreytir fyri, at fólkamentanin kann varðveitast og mennast. Her má nýggj lóggáva til.

## 2.1.5. Íverkseting

Nýggi mentanarpolitikkurin verður settur í verk, millum annað við, at nýggj lóggáva verður gjørd fyri listaøkini, og verandi lóggáva á mentanarrøkinum verður endurskoðað soleiðis:

- at viðkomandi stuðulsskipanir verða gjørdar einfaldari við skjótari og dygdargóðari málsviðgerð
- at nýggjar og tíðarhóskandi stuðulskipanir verða settar á stovn
- at verandi stuðulsmøguleikarnir verða øktir á teimum økjum, sum ætlanin fevnir um
- at fíggjarligur stuðul til list og listaframleiðslu verður viðurkendur sum gjald fyri listalig avrik og fyri listaliga framleiðslu, sum listafólkini lata samfelagnum
- at bygnaðarligar broytingar verða gjørdar á mentanarliga økinum
- at stovnar og felagskapir, ið varða av listagreinum og listafólkum, verða styrktir og gjørdir betur førir fyri at veita tær tænastur, ið áliggja teimum
- at listafólk fáa størri ávirkan á listapolitikk og stuðulsveitingar
- at meginreglan um, at tað almenna skal stuðla uttan at stýra, verður staðfest frá politiskari síðu
- at marknaðurin fyri mentan og list kann verða styrktur og víðkaður

- at ábøtur verða gjørdar á sosialu og búskaparligu kor listafólksins eitt nú við atliti at skattaviðurskiftum og inntøkutrygd
- at rættarligu viðurskifti listafólksins verða styrkt eitt nú við atliti at upphavsrætti v.m., og
- at fortreytir verða skaptar fyri samstarvi millum mentan og vinnulív.

# 2.2. Felags fyri listaøki og listafólk

## 2.2.1. Mentanargrunnur Landsins – flaggskipið í mentanarpolitikkinum

Mentanargrunnur Løgtingsins, sum upprunaliga varð stovnaður 1946, varð í 2000 skipaður við lóg og samstundis nakað umskipaður, eins og hann fekk navnabroyting til Mentanargrunnur Landsins. Henda lóggáva varð gjørd í samband við, at játtanin til grunnin var munandi økt, so at hon í fíggjarárinum 2002 er kr. 3 mió.

Sambært galdandi skipan verður nevndin vald soleiðis, at landsstýrismaðurin velur tveir nevndarlimir eftir tilmæli frá Listafólkasambandi Føroya, LISA, og tríggjar nevndarlimir eftir egnari avgerð. Landsstýrismaðurin í mentamálum tilnevnir formann og næstformann millum nevndarlimirnar. Nærri reglur fyri skipan og virksemi grunsins eru ásettar í kunngerð.

Í *Avmarkaðum marknaði* vórðu sett nøkur ynski fram viðvíkjandi framtíðar skipan Mentanargrunsins. Mælt varð til eina nógv breiðari og munabetri skipan við starvslønum:

- at játtanin verður økt til kr. 15 mió.
- at nevndin verður vald eftir fakligum eyðkennum
- at játtanin verður býtt eftir nærri ásettum reglum út á tær ymsu listagreinirnar.

Sammeta vit lógina frá mai 2000, so sæst, at nøkrum av hesum ynskjum eru gingið á møti, eitt nú viðvíkjandi nevndarvali og fleiri og betur skipaðum starvslønum. Harafturímóti er játtanin langt frá ynskjunum í *Avmarkaðum marknaði*. Hóast Mentanargrunnur Landsins soleiðis er vorðin betur skipaður og játtanin økt, so má ásannast, at hesar ábøtur ikki røkka sum frá líður, og tí er neyðugt at menna grunnin enn meira.

Skal Mentanargrunnur Landsins av álvara gerast flaggskipið í mentanarpolitikkinum, eigur endamálsorðingin at verða greiðari. Filmslist, videolist og aðrar nýggjar listagreinir eiga at verða tiknar við, og meiri dentur eigur at verða lagdur á eksperimenterandi list og tvørgangandi átøk.

Hóast tað ikki er langt fráliðið, síðan Mentanargrunnur Landsins var skipaður við lóg, eigur kortini longu nú at verða farið nøkur stig

víðari at víðka um virkisøki grunsins, at umskipa og útbyggja grunnin eitt nú eftir hesum leisti:

- Skapandi og útinnandi list
- Annað mentanarligt virksemi
- Filmslist, netlist og margmiðlar.

## 2.2.2. Skapandi og útinnandi list

Mentanargrunnur Landsins verður umskipaður til ein *mentanar, lista- og filmsgrunn*, so at skilt verður millum stuðul til vanligt mentanarligt virksemi, forlagsvirksemi øðrumegin og stuðul til listafólk og til listaligt virksemi hinumegin, umframt at grunnurin skal kunna stuðla films- og margmiðlalist.

Játtanin til list eigur at verða býtt sundur millum listagreinirnar: bókmentir, tónlist, myndlist, dans, leiklist, listahandverk, listaliga formgeving, byggilist og annars til listaligt virksemi, ið kann javnmetast við hesar her nevndu listagreinir. Stuðul verður so latin listafólkum, ið virka innan nevndu listagreinir. Við atliti at skapandi og útinnandi list verður virksemi grunsins sostatt skipað eitt nú soleiðis:

- Talið á starvslønum eigur at verða munandi økt, og tíðarskeið og skipan skulu verða meira fjøltáttað og liðilig
- Mentanargrunnurin eigur at átaka sær allar vanligar arbeiðsgevaraskyldur, so leingi viðkomandi listafólk er undir skipan við starvsløn
- Mentanargrunnurin eigur at kunna keypa list
- Partur av játtanini hjá Mentanargrunninum eigur at verða tilskilaður ungari og eksperimenterandi list
- Partur av játtanini verður tilskilaður listaligum tilboðum til børn og ung og til listaligt virksemi hjá børnum og ungum
- Mentanargrunnurin eigur at stuðla týðingum av føroyskum bókmentum til fremmand mál
- Mentanargrunnurin eigur at stuðla listafólki at fara á skeið.

Uppgávan at stuðla vísindaligum virksemi og útgávu av vísindaligum verkum verður loyst frá Mentanargrunni Landsins og løgd til annan stovn, eitt nú Granskingargrunnin.

## 2.2.3. Annað mentanarligt virksemi

Eftir umskipanini sambært hesa ætlan skal grunnurin framyvir kunna stuðla:

- Bókaútgávu við upp til 50% av útgávukostnaðinum eftir nevndarinnar avgerð av siðsøguligum ella mentanarsøguligum bókmentum, ið ikki beinleiðis koma undir virksemi ella skyldur Granskingargrunsins
- Fløguútgávu við upp til 50% av útgávukostnaðinum eftir nevndarinnar avgerð
- Stuðla útreiðslur í sambandi við framsýningar við upp til 50%
- Tiltøk og verkætlanir, ið hava til endamáls at breiða út kunnleika um og stimbra føroyska fólkamentan
- Verkætlanir ella tiltøk, ið hava til endamáls at varðveita vakrar og týðandi fornar siðir og føroyska siðvenju t.d. livandi framsýningar, arbeiðandi framsýningar, innsavningar, ið ikki hoyra til øki Granskingargrunsins
- Mentanarligt arbeiði á bygd og í bý t.d.: tiltøk við upplýsandi fyrilestrum, søguligum, siðsøguligum og alment kunnandi framsýningum, heimasíðum, dansistevnum, stevnum at siga frá søgu, menning av fólksligum frásøgukynstri v.m.
- Virksemi, ið hevur til endamáls at spjaða mentanarlig tilboð kring landið
- Ráðstevnur hjá sjálvbodnum áhugafeløgum, ungdómsfeløgum v.m.
- Starvsløn til eitt nú siðsøguligt rithøvundavirksemi, verkætlanarvirksemi við tí endamáli at menna mentanarlívið uttan fyri meginøkið v.m. kann verða latin eftir somu reglum, sum galda fyri listafólk, tó eigur talið á starvslønum at vera væl minni á hesum øki enn á listaøkinum
- Føroyskur dansur og virksemi í hesum sambandi eiga at verða stuðlað, og serstøk fyrilit verða havd fyri barnadansi og tiltøkum, ið menna áhugan hjá børnum og ungum fyri dansinum
- Føroyskt bátasmíð kann verða stuðlað eftir nærri reglum settum av nevnd grunsins.

## 2.2.4. Filmslist, netlist og margmiðlar

Filmslistin eigur at verða stuðlað við almenna mentanarpolitikkinum, og málið er at byggja upp eina føroyska films- og videoframleiðslu hetta til 2006. Filmslistin er ein so sermerkt og kostnaðarmikil listagrein, at beinast hevði kanska verið at stovnað ein serstakan films-

grunn. Mælt verður tó til at víðka virksemið hjá Mentanargrunninum, so at hann á munagóðan hátt kann veita stuðul til filmsframleiðslu, stuðul til framleiðslu av føroyskum loftmiðlatilfari og til list, skapað við digitalari tøkni.

Játtanin til framleiðslu av loftmiðlalfari á grein 7 á løgtingsfíggjarlógini, sum í 2002 er kr. 700.000, eigur at verða flutt til Mentanargrunn Landsins.

Skulu vit í Føroyum byggja upp ein veruligan listaliga dyggan filmsídnað, so má ein gera sær greitt, at hetta er ein sera dýr verkætlan. Men hetta eigur at verða roynt, tí Føroyar eiga talentini í ungum, vælútbúnum leikstjórum, framleiðarum og sjónleikarum. Her er talan um eitt mentanarligt vakstrarøki, har tøkniliga menningin gevur nýggjar møguleikar, ið vit ikki høvdu áður í Føroyum.

Vit eiga eisini at hava í huga, at hetta er eitt øki, har møguleikarnar fyri fígging úr grunnum hjá altjóða felagsskapum og stovnum eru sera góðir. Hugsað verður fyrst og fremst um Norðurlendska Films- og Sjónvarpsgrunnin (Nordisk Film og TV fond). Hesin grunnur hevur havt stóran týdning fyri norðurlendska filmlist. Norðurlendski Films- og Sjónvarpsgrunnurin er eitt millumlanda samstarv, har í løtuni bert teir suverenu norðurlendsku statirnir taka lut. Hinvegin er væntandi, at Norðurlond fara at taka sjálvstýrandi londini upp í samstarvið, um ynski verður sett fram um hetta. Vit hava siðvenjuna frá Norðurlendska Mentanargrunninum, har tey sjálvstýrandi londini fingu sjálvstøðugan limaskap í oktober 2001. Skal ein komandi føroysk filmslist troyta stuðulsmøguleikarnar í Norðurlendska Filmsgrunninum, mugu Føroyar fara upp í hetta samstarvið, og er ein treytin tá, at vit hava okkara egna filmsgrunn. Ein annar fíggingarmøguleiki er stuðul frá ES. Lond, t.d. Ísland, ið hava EBS-samstarv, ið ikki bert er eitt búskapaligt samstarv, men eisini fevnir um útbúgving, gransking og mentan, fíggja ein stóran part av teirra filmsframleiðslu við stuðli úr ES, har møguleikarnir eru sera góðir, treytað av at umsøkjari framleiðir dygdarfilm og sjónvarp. Um Føroyar skulu gera sær vónir um at byggja upp filmslist, er eisini neyðugt við útlendskari privatari fígging, og er limaskapur í Norðurlendska Films- og Sjónvarpsgrunninum ein fortreyt fyri slíkum fíggingarmøguleikum.

Nútímans samfelagið er ikki bert eitt vitanar-, kunningar- og upplivingarsamfelag. Nútímans samfelagið er eisini vorðið eitt *netverksamfelag*. Hetta heitið fevnir um eitt samfelag, har nógvar broytingar henda, har nýtslan av kunningartøkni er nógv útbreidd og hartil er á

sera høgum tøkniligum støði við nýggjum digitalum samskifti, og har altjóðagerð og globalisering av álvara eru farin at rína við á flestu samfelagsøkjum. Tað, sum hugsað verður um í hesum sambandi, er, at tað í roynd og veru ikki í sjálvum sær eru tøknin og kunningin, men netverkini, ið broyta heimin. Heitið netverksamfelag kann tí verða nýtt um eitt samfelag, har digitalu netverkini verða nýtt innan øll týðandi samfelagsøki eitt nú við pc-telduni og øllum, ið har til hoyrir við interneti og telduposti, við fartelefonini, sjónvarpinum, elektróniska álmanakkanum o.s.fr. Føroyar eru eins og øll onnur tøkniliga framkomin lond væl á veg inn í netverksamfelagið. Við netverksamfelagnum fáa listafólk nógvar nýggjar møguleikar og nógvar nýggjar avbjóðingar, og tí má mentanarpolitikkurin eisini fevna um hetta økið.

Gongdin uttanlands hevur verið tann, at tað er komin fram ein serstøk netlist, og at henda netlist hevur støði í siðbundnari list. Henda list gongur tvørtur um mark millum ymsar listagreinir, og hava myndugleikar uttanlands longu nú tikið stig til at tryggja hesari nýggju list stuðul, so at hon kann mennast. Nógvir spurningar reisa seg í sambandi við netlist, eitt nú spurningar um spjaðing (formidling), varðveiting, upphavsrætt o.m.a. Við lóggávu verður roynt at tryggja rættindahavarum teirra fíggjarligu áhugamál við neyðturviligum fyriliti fyri atgeingi almenningsins til kunning.

Netlist ger seg serstakliga galdandi innan tónleik, film, bókmentir og myndlist, men eisini aðrar listagreinir eru um at koma við á hesum øki. Tað er júst innan hesar greinir, at framleiðsluviðurskiftini eru grundleggjandi broytt. Uttanlands verður netlist stuðlað fíggjarliga frá almennari síðu. Somuleiðis er netlistin um at koma inn sum lærugrein í listaskúlum.

Mælt verður til, at føroysk netlist verður stuðlað av Mentanargrunni Landsins. Eisini verður mælt til, at sett verður nevnd við umboðum fyri Mentamálastýrið, Vinnumálastýrið og viðkomandi feløg (framleiðarar eins væl og listafólk) at viðgera støðuna hjá list og listafólkum við atliti at netverksamfelagnum.

## 2.2.5. Bygnaður og skipan

Skulu málini fyri listaøkið røkkast, er neyðugt at umskipa Mentanargrunnin nakað og útbyggja leiðslubygnaðin. Hesin bygnaður skal tryggja, at játtanarpolitikkurin verður framdur samsvarandi málinum.

Skipanin við núverandi nevndarbygnaði hevur, hóast hon bert hevur verið í gildi í stutta tíð, virkað væl. Harafturímóti er bygnaðurin ikki í samsvari við meginregluna um armslongd. Nevndarsamansetingin eigur tí at verða broytt soleiðis:

Landsstýrismaðurin í mentamálum velur
- tveir limur eftir tilmæli frá LISA
- ein lim eftir tilmæli frá teimum stovnum, ið umsita mentanararvin, og
- tveir limir eftir egnari avgerð, ið eru sakkønir á mentanarøkinum, og er annar teirra formaður.

## 2.2.6. Umsiting

Verður henda umskipan gjørd, er neyðugt, at Mentanargrunnur Landsins fær umsiting, sum burtur av tekur sær av at røkja skrivstovuhaldið hjá grunninum. Umsitingin hevur higartil virkað væl, men hon kemur at vaksa so mikið nógv, at neyðugt verður við skrivstovu, ið er mannað fulla tíð. Neyðugt verður ivaleyst við einum fólki afturat við fakligum førleika at málsviðgera allar tær nýggju uppgávurnar, ið verða lagdar til grunnin.

## 2.2.7. Játtan

Í *Avmarkaðum marknaði* verður mælt til, at játtanin til Mentanargrunnin skal verða kr. 15 mió. í 1998. Við hesum tilmæli í baksýni má staðfestast, at langt er á mál við játtanini til grunnin. Játtanin til Mentunargrunn Landsins er kr. 3 mió. fíggjarárið 2002.

Síðan *Avmarkaður marknaður* kom út, eru komnir til aðrir stuðulsmøguleikar eitt nú *veddingarpengarnir* og *Ymsir Studningar – stuðul til onnur endamál* á løgtingsfíggjarlógina. Við støði í játtanini 2003 eigur játtanin at verða hækkað við umleið 30% árliga, so at játtanin í 2006 er umleið 9,9 mió. kr.

**Talva 1** *Uppskot til játtanarkarmar fyri Mentanargrunn Landsins 2002-2006*

| **Ætlanarskeið** | **2002** | **2003** | **2004** | **2005** | **2006** |
|---|---|---|---|---|---|
| Játtan til Mentanar-grunn Landsins | 3.000 | 4.500 | 5.850 | 7.605 | 9.887 |

Mælt verður til:

- at løgtingslóg um Mentanargrunn Landsins verður endurskoðað og broytt samsvarandi nevndu uppskotum og hugskotum
- at miðað verður eftir eini politiskari semju, ið tryggjar, at játtanarkarmar Mentanargrunsins tíðarskeiðið 2002-2006 verða í minsta lagi, sum skotið er upp í talvu 1.

Tíðarkarmur: 1. januar 2003.

# 2.3. Sosial og búskaparlig viðurskifti

## 2.3.1. Virkisumstøður og lívskor

Tað er yvirhøvur og ikki minst í Føroyum ein ótrygg tilvera at vera yrkislistafólk. Tað má tí vera ein partur av mentanarpolitikkinum at bøta um sosialu korini hjá listafólkunum, og so langt tað er møguligt at tryggja teimum somu rættindi, sum vanliga eru tryggjað fólki á arbeiðsmarknaðinum. Ein trupulleiki í hesum spurningi er, at listafólk og virksemi teirra hóska illa inn í eitt samfelag, ið byggir á marknaðarbúskap. Nøkur listafólk verða skrásett sum sjálvstøðug vinnurekandi, onnur ikki, nøkur hava so tungt við at liva av síni list, at tey noyðast at hava annað arbeiði við síðuna av sínum listaliga arbeiði. Uppaftur onnur eru flutt av landinum fyri at kunna lívbjarga sær sum yrkislistafólk.

Hesir spurningar eru í stóran mun tengdir at spurninginum, hvør er listafólk, og hvussu vit allýsa hugtakið yrkislistafólk. Hesi viðurskiftið mugu greiðast í sambandi við at fáa til vega einhvørja inntøkutrygdarskipan fyri yrkislistafólk. Eisini tá talan er um unga list og kanska serstakliga eksperimenterandi list er alneyðugt við eini inntøkutrygdarskipan. Tað er torført hjá listini at liva av marknaðinum, men eingin tjóð kann vera listina fyri uttan, og tí má samfelagið taka ábyrgd av at stuðla listafólkunum.

## 2.3.2. Rættindi og lóggáva

Tær ábøtur og broytingar, ið mælt verður til, eru mangan so víttfevnandi og kostnaðarmiklar, at tað verður neyðugt at lóggeva á økinum. Talan kann verða um broytingar í skatta- og avgjaldslóggávu til tess at tryggja yrkislistafólkum støðu sum sjálvstøðug vinnurekandi.

Lógin um upphavsrætt er avgreidd við ríkislógartilmæli og er lýst. Spurningurin um upphavsrættin er ein stórur spurningur og fær alt meira týdning við tøkniligu gongdini. Við eini betri verju av upphavsrætti hjá listafólkum kundi ivaleyst verið bøtt um inntøkumøguleikarnar hjá listafólkum og framleiðarum.[20] Tað, sum liggur aftan fyri

[20] Spurningurin generelt um rættindi listafólksins er væl lýstur í Duelund, 1995, s. 96 ff. Eitt nú verður greitt frá hesum máli í altjóða høpi.

allan spurningin um upphavsrætt, er, at listafólk eins og øll onnur í samfelagnum eiga gjald fyri teirra avrik ella framleiðslu. Tað er eisini møguligt, at allur spurningurin um upphavsrættin eigur at viðgerast einaferð enn. Tær broytingar í ríkislógini um upphavrætt, ið nú er lýst, eru gjørdar eftir ynski frá feløgunum. Men eftir at lógin er vorðin lýst, hava umboð fyri ávís feløg víst á, at umsitingin av lógini kann geva trupulleikar fyri eitt nú Fjølrit. Um Fjølrit ikki megnar at samráða seg til eina nøktandi skipan, eigur málið at verða tikið upp politiskt.

Listafólk eru ofta í tí støðu, at tey eru uttan inntøku, hóast tey eru virkin sum listafólk og kunnu vísa á stór listalig avrik. Hetta er ein ósømilig, trupul og ótrygg støða, ið eitt framkomið samfelag í longdini ikki kann loyva sær at bjóða sínum listafólkum. Tað tykist at vera trupult at finna fram til eina nøktandi loysn á hesi støðu. Talan er jú ikki um vinnuloysi men um inntøkuloysi. Ein nøktandi loysn á hesum trupulleika krevur nýhugsan og samstarv millum fleiri myndugleikar, felagsskapir og stovnar. Mentamálastýrið fer í næstum at taka stig til at seta arbeiðsbólk umboðandi viðkomandi myndugleikar, stovnar og felagsskapir við tí setningi at gera uppskot til eina inntøkutrygdarskipan fyri listafólk.

Mong yrkislistafólk hava skattligar trupulleikar, og eigur tí at verða settur ein arbeiðsbólkur við umboðum fyri skattavaldið, Mentamálastýrið og LISA við tí endamáli at greina hesar trupulleikar og koma við uppskoti til møguligar lógarbroytingar.

Herumframt eigur, sum nevnt, eisini at verða gjørd ein *lóg um stuðul til list og listaligt virksemi.* Henda lóg eigur at fevna um myndlist, bókmentir, tónleik og stuðul til LISA v.m. Leiklistaøkið verður skipað við serstakari lóg.

Ein komandi lóg um stuðul til list og til listaligt virksemi eigur at heimila landsstýrismanninum í mentamálum at veita stuðul til menning av øllum listagreinum. Innan lógarinnar karmar eigur at fáast til vega árlig játtan til frama fyri myndlist, bókmentir, tónleik, leiklist, dans og listahandverk. Til hvørt listaøkið sær verður sett av ein upphædd til menningararbeiði. Listaráðini fyri hvørt listaøkið eiga at ráða yvir hesari upphædd. Nærri verður greitt frá hesum hugskotum undir táttunum um tey einstøku listaøkini.

Til tess at bøta um virkismøguleikar hjá listafólkum eigur tað almenna í størri mun enn nú at nýta listafólk og lata teimum uppgávur.

## 2.3.3. Virðislønir

Øll framkomin lond hava einahvørja skipan við heiðurslønum at heiðra framúrskarandi listafólk. Mest kendu virðislønir uttanlands eru Nobelvirðislønirnar, norðurlendsku virðislønirnar og Sonning-virðislønin. Fleiri Norðurlond hava, umframt skipanir við tíðar-avmarkaðum starvslønum, eina skipan, har ávís listafólk fáa eina lívs-langa listafólkaløn, og hava t.d. nakrir føroyskir listamenn fingið hesa løn frá danska statinum.

Á løgtingsfíggjarlógini er konto, sum eitur *Heiðursgávur til Menta-fólk*. Endamálið við játtanini er at heiðra listafólk. Játtanin, ið sett er av til hetta endamál, er kr. 500.000,- fíggjarárið 2001. Talan er um eitt ávíst tal av mentafólkum, sum árliga fáa kr. 20.000,- í sømdarpeningi í part sum eina lívslanga heiðursgávu. Tað, sum eftir er av játtanini, fer m.a. til Mentanarvirðisløn Landsins at heiðra mentafólk, sum við avrikum sínum ríka føroyska mentan við skaldskapi, myndlist, leik-list, tónlist ella aðrari list. Landsstýrismaðurin setir nevnd eftir tilmæli frá LISA, sum ger tilmæli um, hvør ið eigur at fáa Mentanarvirðisløn Landsins. Mentanarvirðislønin verður latin árliga og er kr. 150.000,-. Henda virðisløn tykist at hava vunnið stóra virðing og tign millum manna.

Í 2001 varð sett á stovn Heiðursgáva Landsins upp á 75.000,- kr. at heiðra fólk, fyritøku ella felagsskap, ið hava framt framúrskarandi mentanarlig avrik. Landsstýrismaðurin ger av, hvør ið skal heiðrast við hesi sømdargávu.

Tað hevði verið skilagott at havt eina virðisløn fyri barnamentanarlig avrik og fleiri virðislønir, so tað almenna kundi heiðrað einstøk lista-fólk fyri avrik innan ávísa listagrein[21]. Í hesum sambandi kann verða nevnt, at í útnorðurssamstarvinum er sett á stovn Barnabókavirðisløn Útnorðurráðsins, ið væntandi fer at koma føroyskum barnabókment-um til góðar.

## 2.3.4. Kringvarp og list

Kringvarp er sera týðandi mentanarberi. Útvarp Føroya og Sjónvarp Føroya hava stóran týdning fyri føroyskt mál, mentan og list. Tað eig-

[21] Virðislønin fyri barnamentan kann verða fíggjað av konto fyri *Børn og ung* (Vedd-ingarpengarnir).

ur at verða sjálvsagdur partur av føroyskum mentanarpolitikki, at almennu loftmiðlarnir útbreiða føroyska list og kunna um føroyska list. Hetta er jú ein vanlig almenn public service skylda.

Landsstýrismaðurin fer í næstum at seta eina fjølmiðlanevnd við breiðari fakligari, tøkniligari og fjølmiðlapolitiskari vitan og førleikum til tess at greina allan fjølmiðla- og kringvarpsspurningin út í æsir og koma við tilmælum um, hvussu vit best skipa fjølmiðlapolitikkin og almenna kringvarpið í Føroyum. Henda nevnd skal m.a. greina allar public service skyldur hjá Útvarpi Føroya og hjá Sjónvarpi Føroya. Í hesum sambandi eigur henda nevnd eisini at viðgera spurningin um kringvarp sum mentanarbera.

Ein uppgáva hjá nevndini eigur tí at vera at koma við uppskoti um, hvussu útvarp og sjónvarp sum eina public service skyldu í nógv størri mun enn í dag kunnu stuðla, formidla og menna føroyska mentan og list. Tað er eyðsæð, at útvarp og sjónvarp hava alt at vinna við í størri mun at brúka listafólk eins og lurtarar og hyggjarar fáa eina betri tænastu og fatan av samtíðar mentanarspurningum og listarákum.

Tilmæli:
Mælt verður til, at sett verða í verk tey tiltøk, ið eru skotin upp frammanfyri, eitt nú við:

- at gera uppskot til løgtingslóg um stuðul til list og listaligt virksemi
- at gera uppskot til inntøkutrygdarskipan fyri yrkislistafólk[22]
- at seta nevnd at viðgerða skattligu viðurskiftini hjá listafólkum.

Tíðarkarmur: 1. januar 2003.

[22] Í Duelund, Den danske kulturmodel, 1999 s. 122 verða umrøddar ymsar royndir eitt nú í Danmark at seta á stovn inntøkutrygdarskipanir fyri listafólk. Hesar royndir hava higartil verið til fánýtis. Duelund mælir í somu bók til stovnan av einum sosialum trygdargrunni fyri yrkislistafólk. Hetta kundi verið eitt hugskot vert at umhugsað í Føroyum eisini.

# 2.4. Fyrisiting og altjóða samstarv

## 2.4.1. Mentamáladeildin

Mentamáladeildin er deild í Mentamálastýrinum og er sostatt partur av fyrisitingini hjá landsstýrismanninum í mentamálum. Deildin eigur at hava ta yvirornaðu fyriskipanina og ráðgevingina fyri tað mentanarliga økið. Mentamáladeildin umsitur nakrar stuðulsjáttanir til mentan og list.

Ein partur av teimum játtanum, sum í dag liggja undir Mentamálastýrinum, eigur at verða lagdur til ávikavist Mentanargrunnin og *listaráðini*, sum seinni verða umrødd í hesum álitinum, at umsita. Ein tílík skipan fer at tryggja mest effektivu nýtsluna av játtanunum, og hon tryggjar listafólkunum størri ávirkan, samstundis sum hon fer at tryggja, at nýtslan verður samskipað og nýtt, har tørvurin er størstur.

## 2.4.2. Játtan til mentanarpolitisk endamál

Mentamálastýrið ræður í dag yvir konto, ið nevnist *Stuðul til onnur endamál*. Henda játtan verður framyvir at nýta til serstøk tiltøk av strategiskum týdningi fyri mentanarpolitikkin. Eisini skal peningur úr hesi játtan nýtast til tiltøk til frama fyri fólkamentan. Herumframt skal henda játtan tryggja, at tann mentanarpolitikkur, sum lýstur er í hesum áliti, verður settur í verk í tíðarskeiðinum 2002-2006. Roknað verður við, at umleið 1 mió. kr. av hesari konto verður flutt til listaráðini, um lóggáva um stuðul til list verður framd.

**Talva 2** *Mentanarpolitisk endamál – uppskot til játtanarkarmar 2002-2006*

| Ætlanarskeið | 2002 | 2003 | 2004 | 2005 | 2006 |
|---|---|---|---|---|---|
| Játtan | 1.700 | 770 | 847 | 932 | 1.025 |

## 2.4.3. Norðurlendskt mentanarsamstarv og Útnorðurssamstarv

Stovnað verður serstøk konto undir Mentamálastýrinum til føroyska luttøku í norðurlendskum mentanarsamstarvi og í mentanarsamstarvi í Útnorði. Hetta samstarv hevur stóran týdning fyri føroyska mentan og list. Tað snýr seg ikki bert um fígging men um at knýta

bond, menna samstarv og um at læra av hvørjum øðrum og um alt tað, ið føroysk mentan hevur at geva sínum grannalondum.

**Talva 3** *Mentanarsamstarv í Útnorði – uppskot til játtanarkarmar 2002-2006*

| Ætlanarskeið | 2002 | 2003 | 2004 | 2005 | 2006 |
|---|---|---|---|---|---|
| Mentanarsamstarv í Útnorði (1) | 250 | 400 | 440 | 484 | 532 |

(1) 250.000 kr. eru í dag á konto Ymsir studningar. Játtanin er til føroysku, íslendsku og grønlendsku mentanar-avtaluna, barnabókavirðisløn Útnorðurs og annað mentanarligt samstarv í Útnorði.

Útnorðursráðið hevur fleiri ferðir sett fram ynski um eitt tættari mentanarligt samstarv millum tjóðirnar í Útnorði – Grønland, Føroyar og Ísland. Ráðið hevur samtykt, at gerast skal mentanarpolitisk menningarætlan, og at stovnast skal barnabókavirðisløn v.m.

Í 2002 er sett á stovn norðurlendsk verkstova (NIFCA-verkstova) í Leirvík í húsunum hjá Jóannesi Kristiansen, listamálara, sála.

**Talva 4** *Norðurlendskt mentanarsamstarv – uppskot til játtanarkarmar 2006-2006*

| Ætlanarskeið | 2002 | 2003 | 2004 | 2005 | 2006 |
|---|---|---|---|---|---|
| Norðurlendskt mentanarsamstarv (1) | 250 | 375 | 413 | 454 | 499 |

(1) Tað eigur at verða havt í huga, at nýtslan av hesum játtanum útloysir annan pening úr norðurlendskum ella úr fíggingarkeldum og frá stovnum í Útnorði. Í norðurlendskum høpi kann ein rokna við einum multiplikatorfaktori uppá 3-4.

## 2.4.4. Annað altjóða samstarv

Skipað verður fyri, at Føroyar koma upp í UNESCO samstarv og annað altjóða samstarv á mentanarøkinum eitt nú við at stuðla listafólkum og feløgum teirra til luttøku í altjóða samstarvi. Talan kann verða um eitt nú filmstevnur, listraframsýningar, ráðstevnur v.m.

**Talva 5** *Altjóða samstarv – uppskot til játtanarkarmar 2002-2006*

| Ætlanarskeið | 2002 | 2003 | 2004 | 2005 | 2006 |
|---|---|---|---|---|---|
| Altjóða mentanar-samstarv | 250 | 275 | 303 | 333 | 366 |

Tilmæli:
Mælt verður til, at játtanin 2002-2006 til mentanarsamstarvið í Útnorði, og mentanarsamstarvið innan karmarnar av Norðurlandaráðnum og Norðurlendska Ráðharraráðnum og til altjóða samstarv verður, so sum skotið er upp í talvunum 3, 4 og 5.

Tíðarkarmur: Fíggjarárini 2002-2006.

# 2.5. Skapandi og útinnandi list

## 2.5.1. Bygnaður og skipan

Mentamálastýrið hevur kannað umstøðurnar hjá skapandi og útinnandi listafólki og er komið til ta niðurstøðu, at tørvur er á broytingum á hesum øki. Endamálið við at endurskipa listaliga økið er ein roynd at betra um umstøðurnar hjá listafólkunum og at tryggja, at tær ymisku listagreinirnar verða stuðlaðar eftir einsháttaðum meginreglum. Endurskipanin hevur eisini til endamáls at menna tað listaliga umhvørvið, umframt at menna dygdina á listaliga økinum og at geva listafólkunum størri ávirkan á mentanarpolitikkin.

## 2.5.2. Mentanarráð Føroya

Stovnað verður *Mentanarráð Føroya* at ráðgeva landsstýrismanninum í mentamálum við yvirskipaða mentanarpolitikkinum. Mentanarráðið skal virka fyri góðum samstarvi og samskifti millum stovnar og einstaklingar, ið starvast við list, fólkamentan og varðveiting av mentanararvinum.

Mentanarráðið kemur saman eina ferð um árið at viðgera tann rikna mentanarpolitikkin og at umrøða evni av almennum týdningi fyri mentan og list. Landstýrismaðurin tekur saman við sínum embætisfólkum lut í ársfundinum. Mentanarráðið er ætlað sum eitt orðaskiftismót, har til ber at skifta orð um mentanarligar spurningar av felags áhuga og lýsa teir frá ymsum síðum, har ein kann fáa fram góð hugskot, og har landsstýrismaður og umsiting so at siga verða sett andlit til andlits við umboðum fyri mentanarlívið og fáa at vita, hvørji ynskini eru, og hvat hesi umboð meta um støðuna.

Formenninir í listaráðunum eiga at verða limir í Mentanarráðnum. Men ráðið eigur at hava aðrar limir eisini. Landsstýrismaðurin ásetir annars nærri reglur um ráðsval, skipan og virksemi ráðsins.

## 2.5.3. Listaráð

Fyri hvørt listaligt meginøki verður stovnað eitt listaráð. Høvuðsendamálið við listaráðunum er at menna viðkomandi listaøkið og at

menna samstarvið millum ymisk listaøki og millum listafólk innan eitt ávíst listaøki. Ráðini eiga at virka fyri øktum samstarvi og menning av teimum einstøku listaøkjunum. Ráðini eru samstundis ein roynd at samansjóða og lætta um samskiftið og skapa betri fatan millum ymsu sløgini av list.

Víðari er uppgávan hjá ráðunum árliga at kunna landsstýrismannin um, hvørji tiltøk, feløgini arbeiða við, og koma við tilráðingum um, hvussu tað listaliga umhvørvið kann betrast. Harumframt eigur viðkomandi listaráð at fáa allar umsóknir yvir eina ávísa upphædd t.d. 100.000 kr., ið eru komnar til Mentanargrunn Landsins, til hoyringar.

Listaráðini eiga ikki bert at verða ráðgevandi, men eiga at umsita ávísar uppgávur sambært listalógini, eins og listaráðini skulu umsita ta játtan, sum verður tillutað hvørjum listaøki sær á løgtingsfíggjarlógini sambært eina komandi lóg um stuðul til list og listaligt virksemi.

Samantikið eigur at staðfestast, at Mentamálastýrið saman við Løgtinginum sjálvsagt hevur yvirskipaðu ábyrgdina av listapolitikkinum, men samstundis verður sligið fast, at politikkurin eigur at verða myndaður og settur í verk í tøttum samstarvi við listaráðini hvørt á sínum øki. Hetta er fyri at tryggja gott samstarv millum myndugleikar og listafólk, samstundis sum fyrilit verður havt fyri meginregluni um armslongd.

Ætlanin er at samanseta listaráðini soleiðis, at tey hava breiða umboðan, uttan tó at gerast ov stór. Eisini er valt at knýta føroysku umboðini í listanevndunum hjá Norðurlendska Ráðharrastovninum til hvørt listaráðið. Hugskotið við listaráðunum er at tryggja sínámillum kunning um føroyska og norðurlendska listaumhvørvið og teir stuðuls- og samstarvsmøguleikar, ið eru á ymsu listaøkjunum.

## 2.5.4. Listafólkasamband Føroya – LISA

Listafólkasamband Føroya, LISA, varð stovnað í 1982. Endamálið við felagsskapinum er at kveikja og stimbra føroyska list og mentan, at fremja samstarv millum føroysk listafólk og millum tær einstøku listagreinirnar, at virka fyri áhugamálum og rættindum limanna og at umboða limirnar í almennum málum, sum hava felags áhuga. LISA er eitt meginfelag, ið røkir áhugamál felaganna. Sum dømi kunnu vit nevna, at LISA tilnevnir 4 limir í Heiðursgávunevndina og sambært galdandi lóg tveir limir til nevndina fyri Mentanargrunn Landsins.

LISA er skipað við umboðsráði og starvsnevnd. LISA virkar fyri samstarvi, rættindum og fyri at bøta um arbeiðskor hjá listafólki.

Listafólkum tørvar atgongd til eina felags skrivstovu við fundarhøli, so at tey kunnu nýta amboð, so sum teldu, telefon, fax, kopi og frankeringsmaskinu. Harumframt hava tey tørv á ráðgeving og hjálp at skriva umsóknir og fáa kunning um viðkomandi viðurskifti. Skrivstovan er ætlað sum ein tænastustovnur hjá øllum listafólkum í Føroyum. Hon skal kunna veita løgfrøðiliga ráðgeving og ráðgeving í sosialum og fíggjarligum spurningum sum t.d. skattamálum, fíggarætlanum fyri verkætlanir, t.d. framsýningar, og hjálp og ráðgeving í flestøllum spurningum. Skrivstovan eigur eisini at umsita verkætlanir, framsýningar, útgávur og mangt annað av týdningi fyri listafólk, um ynski skuldi verið um slíka tænastuveiting.

Frá fíggjarárinum 2001 er peningur játtaður til LISA av *Stuðli til onnur endamál*, og Tórshavnar Býráð hevur útvegað høli o.a. Fíggjarárið 2002 verða játtaðar 250.000,- kr. Við hesum er eitt gamalt ynski hjá LISA um fastan skrivara gingið út. Talan er um eina 3 ára royndartíð, ið skal eftirmetast í 2003.

Tað er umráðandi, at skrivstovan hjá LISA framyvir megnar at taka sær av sosialum og fakligum spurningum hjá limum úr øllum limafeløgum. Tað hevur víst seg at vera ein stórur tørvur á eini felagsskrivstovu fyri øll áhugafeløg innan listaøkið, og hetta er galdandi fyri yrkislig feløg so væl sum fyri áhugafeløg. Tað tykist, sum ein felagsskrivstova er ein góð loysn, tí feløgini eru ov smá til hvørt í sínum lagi at reka egna skrivstovu og ráðgeving. Í hesum sambandi tykist tað, sum tann hentasta loysnin hevði verið, um skrivstovan hjá LISA kundi verið skipað sum tænastumiðstøð og ráðgevingarstova hjá øllum føroyskum listafólkum. Í talvu 6 er sett eitt dømi um eina rakstrarætlan, ið hevur sum fortreyt, at kommunur og limafeløg taka lut í rakstrinum.

**Talva 6** *LISA – uppskot til játtanarkarmar 2002-2006*

| **Ætlanarskeið** | **2002** | **2003** | **2004** | **2005** | **2006** |
|---|---|---|---|---|---|
| Stuðul – land og kommunur (1) | 350 | 385 | 424 | 466 | 512 |

(1) Herav eru 100.000 frá Tórshavnar Býráð.

Tað átti at borið til at latið hesa felagsskrivstovu virkað sum skrivstovu hjá Mentanarráðnum og hjá teimum einstøku listaráðunum.

Um so verður, eigur stuðulsjáttanin til rakstur av skrivstovuni sjálvsagt at verða hækkaður, og síðan kundi øll skipanin verið eftirmett umleið 2005 ella 2006, tá fyrsta ætlanarskeiðið er úti. Her er spurningurin, um felagið, ið skal samráðast við eitt nú myndugleikarnar vegna tey einstøku limafeløgini um fakligu og sosialu áhugamál limanna, kann húsast í somu hølum og nýta sama starvsfólk sum tann stovnur, ið skal ráðgeva Mentamálastýrinum um mentanarpolitikkin. Í grundini átti einki at verið til hindurs fyri eini slíkari skipan, tí umhvørvið er so avmarkað, at tað ofta vera somu fólk, ið koma fyri í ymsum felagsskapum og umboðanum. Í øllum førum er her ein fullnýtsluvinningur, og møguleikarnir fyri at listafólkini á henda hátt fingu eina effektiva og professionella skrivstovu, skuldu verið góðir.

Tilmæli:
Mælt verður til,

- at listaráðini verða skipað við eini komandi lóg um stuðul til list og listaligt virksemi, sí frammanfyri
- at rakstrarstuðulin til LISA verður ásettur í eini komandi lóg um stuðul til list og listaligt virksemi, og
- at avtala verður gjørd millum Mentamálastýrið og LISA um ymsar tænastuupgávur við atliti at tørvi og rættindum hjá listafólkafeløgum eins væl og listafólkum.

Tíðarkarmur: 1. januar 2004.

# 2.6. Listaøkið

## 2.6.1. List í dagsins samfelagi[23]

Sum samfelagsgongdin hevur verið seinastu árini, er støðan yvirhøvur vorðin tann, at mestsum allar avgerðir hava verið tiknar á búskaparligum støði. Tað tykist, sum verða øll politisk mál fyrst og fremst undirløgd fíggjarligum og búskaparligum fyrilitum.

Okkara mentan er sostatt soleiðis stødd, at list er eitt av teimum samfelagsøkjum, har pláss er fyri teimum andligu og visioneru dimensiónum, ið elva til atfinningar, innlit og samanhang í tilveruni og til at seta teir spurningar, ið lata upp fyri nýggjum hugskotum og sjónum. Listin hevur tí ikki einans sálarheilsuligan og estetiskan týdning. Hon hevur eisini stóran fólkaræðisligan týdning.

Tað er eisini umráðandi, at samfelagið nýtir pening til føroyska list og stuðlar føroyska list. Talan er jú um arbeiðspláss eins og um eitt týðandi alternativ til alt tað, ið fjølmiðlar, internet og altjóðagerðin bera inn á okkum. Tað er eisini umráðandi, at samfelagið viðurkennir, at stuðul, ið verður veittur skapandi og útinnandi listafólkum, ikki er *olmussa*, men gjald, ið samfelagið rindar fyri listaligar tænastur og framleiðslur, sum listafólkini og mentastovnar lata samfelagnum. Lagt kundi verið afturat, at talan er um avrik, sum eitt samfelag ikki kann vera fyri uttan. Listaframleiðsla kann eisini í ávísum førum gerast útflutningsvøra, um rætt verður borið at. Hetta er serstakliga galdandi fyri myndlist og tónleik, men kann væl koma at galda fyri aðrar listagreinir við. Her er ikki so nógv talan um landastødd, men um talentmongd.

Útflutningurin av mentanarligari framleiðslu, serstakliga filmi, tónleiki og listaligum telduframleiðslum, er í sterkum vøkstri í Norðurlondum, og hevur hesin táttur vaksandi týdning fyri búskapin. Men tað er tó ikki hetta, ið telur mest í eygunum hjá stjórnum og tingum. Tað, sum telur mest, er, at tey ráðandi vita, at landið, ið hevur fostrað hesi framúrskarandi listafólkini, kemur í gott orð úti í heimi. Tað verður úti í heimi givið einum landi gætur, ið hevur gjørt tað møguligt

[23] Hugsað er her um øll sløg av skapandi list so væl sum útinnandi list. Hugleiðingarnar um list í hesum tátti eru orðaðar við støði í teimum mongu álitum um list og samfelag, sum í hesum árum koma fram í okkara grannalondum.

hjá ungum evnaríkum listafólkum at skapa stóra list á hægsta altjóða støði. Lat so vera, at t.d. viðkomandi filmur er fíggjaður 95% uttanlands. Tað hevur ongan altjóða áhuga uttan fyri íleggjararnar og er fyri alt tað bara ein fyrimunur. Tað, sum umframt sjálv listaverkini hevur áhuga og vekir ans, er tað listaliga jørðildið og tað eggjandi og íblásandi umhvørvið, ið hevur alið listafólk í heimsklassa – listafólk, ið framleiða list til ein heim, ið hungrar eftir góðari list, ið er øðrvísi, original, hugvekjandi, skakandi og eggjandi. Soleiðis er norðurlendsk list í stóran mun nógv eftirspurd og hevur tí í ávísum førum at kalla óavmarkaðan marknað úti í heimi.

Tað er umráðandi at hava í huga, tá vit umrøða mentanarpolitikk, at list jú kann seljast ella latast øðrum sum ein vøra – tað veri seg ein málningur, ein framsýning ella ein sjónleikur. Listin hevur sostatt ein marknað, hann veri seg stórur ella lítil. Tað ræður tí um í mentanarpolitikkinum at bera so í bandi, at stuðul til list eisini er ein eggjan at troyta og menna ein møguligan marknað og at finna nýggjar marknaðir. Men vit mugu samstundis viðurkenna, at listaligt virksemi í Føroyum kemur neyvan nakrantíð at klára seg av marknaðinum eina.

Her skal tó viðmerkjast, at byggilist – arkitekturur – ikki er ein sjálvstøðug listagrein sum fleiri aðrar listagreinir, men brúkslist. Arkitektavirksemið er ein vinnugrein, sum umsitur stór virði. Av tí at byggilistin er partur av yrkinum hjá arkitektinum, skilir byggilistin seg frá øðrum listagreinum. Tað er ikki tað dagliga virksemið hjá arkitektum, sum skal stuðlast, men tilvitanin um føroyska byggilist. Somuleiðis er menningin innan byggilistina neyðug, fyri at arkitektar framhaldandi kunnu skapa arkitektur á einum høgum dygdarstøði. Í hesum sambandi eigur at verða umhugsað at stovna eina virðisløn fyri føroyska byggilist.

At enda í hesum høpi skal verða mint á tann týdning, list hevur fyri framtíðar vinnufyritøkur. Tað verður vanliga hildið, at kreativu førleikarnir innan mentan og list kunnu styrkja evnini hjá vinnulívinum at broyta seg og mennast. Lond sum Stórabretland, Finnland og Danmark hava góðar royndir á hesum øki.

## 2.6.2. Myndlist

### 2.6.2.1. Endamál

Ongir formligir mentanarpolitiskir karmar eru í dag um myndlistina. Men myndlistafólk kunnu fáa stuðul úr Mentanargrunni Landsins sum starvsløn ella sum annan stuðul. Tað ber eisini til at fáa ávísan stuðul úr Mentamálastýrinum til framsýningar innan- og uttanlands.

Listafólk eiga at hava góðar møguleikar at útbúgva seg og fáa eftirútbúgving. Harumframt eiga myndlistafólkini at hava tíð og fíggjarligar møguleikar at fordjúpa seg. Myndlistin hevur stóran týdning í eini tíð, har fjølmiðlar díkja fólk undir í vánaligum myndum. Okkum tørvar gott myndlistaligt skil í kunningarsamfelagnum.

Av tí at tað myndlistaliga økið er tað økið, sum fær minst stuðul frá tí almenna innan føroysku listaverðina, er neyðugt, at hesum øki verður vístur serligur ansur.[24]

Endamálið við myndlistapolitikkinum er at tryggja eitt breitt og dygdargott listaligt tilboð til øll uttan mun til hvar í landinum, tey búgva. Marknaðurin er so avmarkaður, at bert heilt fáum listafólkum er givið at liva av síni list. Samfelagið má á ein ella annan hátt tryggja professionalismuna og taka yvir, har marknaðurin ikki røkkur.[25]

Til tess at røkka hesum máli er neyðugt, at tað almenna í fyrsta lagi tryggjar tær forteytir, ið eru galdandi og samstundis skapar nakrar nýggjar neyðturviligar fortreytir. Verður støði tikið í *Avmarkaðum marknaði*, eigur myndlistapolitikkurin *”at skapa fortreytir fyri einum umhvørvi, sum myndlistafólk kunnu trívast í”*. Sambært *Avmarkaðum marknaði* er eitt myndlistaumhvørvi til staðar í Føroyum. Sostatt má myndlistapolitikkurin í fyrsta lagi styrkja og menna hetta umhvørvið. Í øðrum lagi eigur myndlistapolitikkurin framyvir at verða soleiðis háttaður, at hann megnar:

[24] Her verður hugsað um skapandi partin, og tí verður sæð burtur frá rakstrinum av Listasavninum, ið fær 1,8 mió. kr. á løgtingsfíggjarlógini 2002.

[25] Fyri tað, um ein mentanarpolitiskt velur at satsa upp á ta professionellu listina, merkir hetta ikki, at áhugalistin eigur at verða slept upp á fjall, heldur tvørturímóti. Her er bert talan um ein annan spurning, og ein er noyddur at síggja áhugalistina í sínum rætta høpi: sum sunt og gott ítriv, sum eigur at verða stuðlað, og sum í givnum føri eitt nú innan leiklistina er ein fortreyt fyri yrkislistini.

- at tryggja føroyskum myndlistafólkum møguleikar at búgva og virka í Føroyum
- at skapa umhvørvi og umstøður hjá serliga ungum gávuríkum listafólkum at útbúgva seg, mennast, liva og virka í Føroyum
- at tryggja ungum myndlistafólkum møguleikar at útbúgva seg uttanlands
- at tryggja myndlistafólkum fíggjarligar møguleikar at eftirútbúgva seg úti sum heima og søkja sær nýggjan íblástur uttanlands
- at breiða út føroyska list í Føroyum og kunnleikan um føroyska list í Føroyum og til grannalond og útheimin
- at stuðla marknaðarføring av føroyskari myndlist innan so væl sum uttanlands
- at tryggja framsýningarmøguleikar kring landið
- at geva myndlistafólki eitt hvørt slag av inntøkutrygd
- at fáa eina serstaka skattaskipan fyri myndlistafólk, og
- at beina burtur forðingar fyri myndlistaligum virksemi í Føroyum.

### 2.6.2.2. Broytingar og ábøtur

Sum støðan er í dag, er tað sera trupult at røkka hesum máli, serliga hjá ungum, nýútbúnum myndlistafólki. Hetta kemst av, at tað oftast tekur nógv ár, áðrenn myndlistafólk fáa inntøkur, sum tey kunnu liva av. Við lógini um Mentanargrunn Landsins er skaptur møguleiki fyri íverksetanarstuðli, kr. 72.000,- árliga í 2 ár, ið merkir eitt framstig.

Næsta stigið er at tryggja myndlistafólki stuðul til rakstur av atelieri í styttri ella longri tíðarskeið. Hetta er eitt upplagt øki, hvar kommunur og landsmyndugleikar kundu samstarvað. Viðkomandi kommuna kundi útvegað myndlistafólkum hóskandi høli, meðan Mentanargrunnur Landsins so kundi veitt stuðul til innrætting og rakstur í einum byrjanarskeiði t.d. 3 ár. Ætlanin er at samráðast við kommunurnar um henda spurning fyri at kanna, um bý- og bygdaráð eru sinnað at stuðla myndlistafólkunum á staðnum. Tað eru ivaleyst hóskandi hús kring landið, t.d. gomul pakkhús og aðrir tómir bygningar, ið eru væl egnaðir til endamálið, og stuðlað kundi eisini verið við hita og ljósi. Eisini kundi hugsast ein skipan, hvar kommunur fingu ein ávísan stuðul til útvegan av atelierum til myndlistafólk t.d. 30% av kostnaðinum.

Myndlistafólk hava sum nú er somu møguleikar at søkja um starvsløn frá Mentanargrunni Landsins. Trupulleikin er, at ov fáar starvslønir eru tøkar til alt listaøkið. Men við tí umskipan av Mentanar-

grunni Landsins, sum er skotin upp í hesum riti, skuldu møguleikarnir fyri fleiri starvslønum til myndlistafólk gjørst munandi betri enn í dag.

### 2.6.2.3. Onnur mennandi tiltøk

Tað er ein fortreyt, um myndlistafólk kunnu mennast, at tey sleppa at kunna seg við myndlist uttanlands, tað veri seg við atliti at listasøgu so væl sum við aktuellu listaligu rákini úti í heiminum. Somuleiðis er tað umráðandi, at føroysk myndlistafólk og listahandverkarar fáa høvi og møguleikar at hava framsýningar uttanlands. Ein skipan við ferðaútreiðslustuðli og stuðli til framsýningar uttanlands eigur tí at verða sett á stovn.

Í flestu Norðurlondum verður mett, at tann besti stuðul, listafólk kunnu fáa, er, at list teirra verður keypt. Føroysk myndlistafólk og listhandverkarar hava somu áskoðan. Men av tí at frælsi marknaðurin bert kann bera ein lítlan part av útboðnum av list, er neyðugt, at tað almenna stuðlar listafólkum við at keypa myndlist og listahandverk. Serstakliga stóran týdning hevur hesin politikkur, har talan er um royndarlist ella sonevnda eksperimenterandi list ella um list hjá ungum ókendum listafólkum, av tí at marknaðurin hevur lyndi til at halda seg til etableraða myndlist.

Almennir stovnar eiga at leggja seg eftir at umhugsa at prýða almennar bygningar við list, og eigur at verða lagt upp fyri hesum, tá fíggjarlógarkarmar verða ásettir. Stovnarnir eiga at fáa serkøna ráðgeving frá Myndlistaráðnum í sambandi við keyp til og prýðing av almennum bygningum. Herumframt eigur eisini við løgtingslóg at verða ásett, at allir almennir nýbygningar skulu verða prýddir við føroyskari myndlist ella listahandverki. Hetta eigur at verða ásett sum ein ávísur prosentsatsur av samlaða byggikostnaðinum. Henda skipan verður nýtt í flestu Norðurlondum við góðum úrslitum.[26]

Tað eigur at vera myndlistafólkum eins og myndugleikum greitt, at prýðing av almennum bygningum setir sera stór krøv til listafólk, arkitektar og øll, sum hava við viðkomandi byggimál at gera. Onkur kundi kanska hildið, at her verður talan um bílagda list, ið bert er til prýðis av einumhvørjum tilvildarligum umhvørvi. Heldur er hetta tvørturímóti, og tað vil altíð vera ein sera torfør uppgáva at skapa list við tøttum tilknýti til byggilist og rúm. Her er tí talan um sera týdningarmiklar og krevjandi listaligar uppgávur. Av hesum skilst, at

[26] Sí t.d. Grut, 1995.

listaligt prýði av nýbygningum ikki kann skiljast frá sjálvum byggimálinum, men eigur hetta at verða samskipað frá fyrsta degi.

Skal føroysk myndlist sum útflutningsvøra mennast enn meira, krevst dugnalig og professionell marknaðarføring, og eigur tað almenna tí at stuðla framflutningi, av føroyskari list uttanlands. Hetta er ein uppløgd uppgáva fyri Myndlistaráðið í samstarvi við LISA og Mentamálastýrið. Hetta er eisini eitt øki, har møguleikar fyri samstarvi við norðurlendskar og aðrar altjóða stovnar eru góðir.

Í spurninginum um framflutning av føroyskari list uttanlands eigur *Norðurbryggjan* at verða nýtt sum eitt hitt fremsta amboðið. At enda í hesum viðfangi eigur at verða nevnt, at spurningurin um mentanarútflutning sum heild eigur at verða loystur við samstarvi millum Mentamálastýrið, Løgmanskrivstovuna, Vinnumálastýrið, Norðurbryggjuna, Norðurlandahúsið og Mentanarráð Føroya, og verður her mælt til, at settur verður fastur arbeiðsbólkur, umboðandi hesar stovnar at taka sær av øllum í hesum sambandi.[27]

Tað er eisini neyðugt at framflyta myndlist innanlands í Føroyum. Tað eigur við øðrum orðum at verða kunnað meira um myndlist og listahandverk serstakliga millum børn og ung. Hetta eigur at verða gjørt í samstarvi við skúlaverkið, og verður hesin spurningur tikin upp í Mentamálastýrinum. Listasavn Føroya eigur at fáa savnspedagog í fast starv at taka sær av at formidla ta list, ið har er savnað. Hesin persónur eigur at samstarva við skúlaverkið. Eisini eigur at verða umhugsað at seta listaráðgeva at verða almennum myndugleikum, skúlum og listasøvnum til hjálpar í listapolitikkinum.

Framsýningin er ein tann mest grundleggjandi fortreytin fyri myndlistina, og tí er umráðandi at bøta um alt, ið kemur undir framsýningarhentleikar. Í uppskotinum um broytingar í Mentanargrunninum er mælt til, at grunnurin skal verða meira virkin við atliti at myndlistini. Talan er um stuðul til myndaskráir, ferðaútreiðslur og aðrar úreiðslur í sambandi við framsýningar. Hetta snýr seg eisini um betri framsýningarmøguleikar kring alt landið, og er hetta tí eisini ein spurningur um formidling av myndlist.

Tað er umráðandi, at allir samfelagsborgarar hava høvi at kunna seg við myndlist. Ein møguleiki er at broyta lógina um siðsøgulig

[27] Mentanarráð Føroya eigur at verða umboðað í bólkinum, av tí at føroyskur mentanarútflutningur snýr seg um annað enn myndlist og listahandverk, eitt nú tónlist, bókmentir, leiklist o.m.a.

bygdasøvn soleiðis, at hesi søvn eisini kunnu virka sum listasøvn. Tey skulu eisini hýsa skiftandi framsýningum, sum eitt nú Listasavnið og Norðurlandahúsið skipa fyri.

Frammanfyri eru skitserað nøkur hugskot, ið kundu ment myndlistina og bøtt um inntøkumøguleikar hjá listafólki. Onnur hugskot, ið bera á sama borðið, eru t.d., at sett verður í gildi lóg um listaframa við tí endamálið at menna list og styrkja støðuna hjá skapandi og útinnandi listafólkum. Hugsast kann, at hvørja ferð tað almenna keypir eitt listaverk, verður lagt eitt ávíst eykagjald afturat kostnaðinum sum ein viðurkenning.

### 2.6.2.4. Útbúgving og eftirútbúgving

Eitt annað mál av týdningi fyri myndlistina er spurningurin um útbúgving og eftirútbúgving hjá myndlistafólkum og listahandverkarum.

Hesin spurningur er í tveimum:
1) útbúgving av listafólki og
2) eftirútbúgving av listafólki.

Hvat fyrra spurninginum viðvíkur, so snýr hann seg um at seta á stovn listaútbúgvingar á miðnámsstøði so væl sum á hægri akademiskum støði í Føroyum. Tað hevur leingi verið talað um at fáa lista- og tónlistaskúla settan á stovn í Føroyum. Spurningurin um ein føroyskan lista- og tónlistaskúla verður viðgjørdur í serstøkum áliti.

Hvat spurninginum um eftirútbúgving viðvíkur, so verður mælt til, at hann verður loystur við broytingum í galdandi lóggávu um útbúgvingarstuðul.

### 2.6.2.5. Myndlistaráð

Um tað skal verða møguligt at røkka teimum málum, ið eru sett fram omanfyri, má myndlistaøkið skipast við løgtingslóg. Skotið verður tí upp, at listalógin fær ein kapittul um myndlist, og at tað sambært listalógini verður skipað eitt myndlistaráð við hesum endamáli:

- at virka til frama fyri myndlistina, byggilistina og listahandverkið í Føroyum
- at ráðgeva almennum myndugleikum í myndlistaligum, byggilistaligum og listahandverksligum spurningum
- at fremja samstarv millum myndlistina, byggilistina og listahandverk

- at gera uppskot til menningarætlan fyri myndlistaøkið.
- Myndlistaráðið kann av tí játtan, ráðið hevur til taks, veita stuðul til hesi endamál:
  - til myndlistafólk og listahandverkarar til framleiðslu í sambandi við egin verk
  - til listaliga framleiðslu og rakstur í egnari verkstovu/verkstaði
  - til gerð av listaverkum til prýðis á verandi og nýggjum almennum og privatum bygningum og plássum
  - til keyp av listaverkum til víðari lán til almennar og privatar bygningar, listasøvn v.m.
  - til viðlíkahald og endurbøting av listaverkum
  - til framsýningarvirksemi hjá myndlistafólkum, arkitektum og listahandverkarum
  - til stovnan av kommunalum og privatum gallaríum og til rakstur av slíkum
  - til eftirútbúgving av myndlistafólki, arkitektum og listahandverkarum
  - til framflyting av føroyskari list innan- so væl sum uttanlands.

Myndlistaráðið, ið eigur at hava 5 limir, kann verða valt soleiðis:
- Landsstýrismaðurin í mentanarmálum velur ein lim, ið er formaður
- Áhugafeløgini velja 2 limir
- Listasavn Føroya velur ein lim
- NIFCA-verkstovan í Føroyum hevur ein lim, ið er føroyska NIFCA-umboðið.

Endamálið við ráðnum er eisini at gera tilmæli til Mentanargrunn Landsins í sambandi við viðgerðina av umsóknum til stórar myndlistaverkætlanir. Harafturat skal ráðið virka fyri, at listaliga umhvørvið fær best møgulig kor at virka undir, samstundis sum ráðið skal virka fyri, at dygdin í listini verður ment. Myndlistaráðið skal árliga kunna landsstýrismannin um, hvørji tiltøk viðkomandi feløg arbeiða við, og koma við tilráðingum um, hvussu tað myndlistaliga umhvørvið kann betrast. Ráðið skal virka fyri øktum og góðum samstarvi millum yrkislist og áhugalist og fyri samstarvi við aðrar listagreinir. Roknað verður við, at umsitingin hjá Myndlistaráðnum verður røkt av skrivstovuni hjá LISA.

Eisini er ætlanin, at lata Myndlistaráðið umsita norðurlendska gestatelierið, sum verður stovnað í næstum. Formaðurin í Myndlistaráðnum er limur í Mentanarráði Føroya.

**Talva 7** *Myndlistaráðið – uppskot til játtanarkarmar 2002-2006*

| **Ætlanarskeið** | **2002** | **2003** | **2004** | **2005** | **2006** |
|---|---|---|---|---|---|
| Virksemi sambært lógásettu uppgávur Myndlistaráðsins | 0 | 400 | 440 | 484 | 532 |

Tilmæli:
Mælt verður til, at ein komandi lóg um stuðul til list og listaligt virksemi, hvat myndlist viðvíkur, verður orðað samsvarandi tilmælunum í hesum tátti.

Tíðarkarmur: 1. januar 2003.

## 2.6.3. Bókmentir

### 2.6.3.1. Endamál

Endamálið við bókmentapolitikkinum er

- at tryggja og økja um útboðið av dygdargóðum bókmentum eftir føroyskar rithøvundar og yrkjarar
- at menna allar bókmentagreinir, eisini barna- og ungdómsbókmentir
- at tryggja rithøvundum og yrkjarum rímiligar virkis- og inntøkumøguleikar
- at tryggja føroyskum týðarum rímiligar samsýningar fyri at flyta heimsbókmentir yvir í føroyskt mál
- at skapa fortreytir fyri, at føroyskur skaldskapur í bundnum so væl sum í óbundnum máli kann verða týddur til fremmand mál, og
- at tryggja og økja um útboðið av heimsbókmentum herundir ikki minst norðurlendskum bókmentum í føroyskari týðing.

Spurningurin um at røkka hesum málum er ein spurningur um

- at útvega rithøvundum og yrkjarum nógv betri fígging til teirra skapandi virksemi
- fígging av útgávuvirksemi, og
- distributión, marknaðarføring og sølu.

Hetta merkir við øðrum orðum, at bókmentapolitikkurin framyvir má leggja dent á at skapa best møgulig bókmentalig framleiðslukor, so at samfelagið hevur eitt breitt, ríkt og dygdargott bókatilboð til fólkið.

Herumframt snýr spurningurin seg, við atliti at støðuni hjá yrkisrithøvundum í samfelagnum, um:

- at styrkja sosialu støðuna hjá yrkishøvundum, so at hesir hava sama sosiala trygdarnet sum aðrir yrkisbólkar
- at gera skattareglur, ið eru til at umsita hjá yrkishøvundum
- at menna støðuna og økja um virðingina fyri rithøvundavirksem-inum í samfelagnum, og
- at styrkja fakligu støðuna hjá rithøvundum, yrkishøvundum eins væl og hjá áhugahøvundum.

Skulu hesi mál verða rokkin í einum fimm ára tíðarskeiði, er neyðugt at lóggeva, og eigur listastuðulslógin tí at útvega myndugleikum, felagsskapum, rithøvundum, forløgum og distributiónsliði tey amboð, ið eru neyðug til tess at menna og stimbra føroyskar bókmentir.

## 2.6.3.2. Rithøvundar – arbeiðsumstøður

Verður sæð burtur frá nøkrum heilt fáum siðsøguligum rithøvundum og enn færri fagurtbókmentaligum høvundum, so er at kalla eingin yrkisrithøvundur, sum í dag livir av at skriva. Yrkishøvundin, tann ið burturav skrivar ella yrkir, hevur at kalla bert Mentanargrunn Landsins at líta á.[28] Við nýggju lógini um Mentanargrunn Landsins eru hóast alt hend nøkur munadygg framstig fyri føroyskar rithøvundar.

Grunnurin hevur fingið hægri játtan, og skipanin við starvslønum er vorðin alment viðurkend, eins og talið á starvslønum er økt. Men samstundis, sum tað kann staðfestast, at grunnurin nú er betur førur fyri at stuðla, má ásannast, at enn er langt eftir, til Mentanargrunnur Landsins er vorðin sjálvt álitið og aðalstøðið hjá føroyskum rithøvundum og forløgum, sí annars brotið um Mentanargrunn Landsins.

Yrkishøvundar eru í einari yrkisligari ella arbeiðsmarknaðarligari serstøðu. Roynt verður her at koma við uppskotum um ábøtur, og vent verður aftur til hesar spurningar seinni í hesum kapitli, sí annars brotið 2.3.

[28] Heitið yrkishøvundur verður her nýtt um rithøvund, ið burturav hevur sum starv at skriva ella yrkja. Heitið eigur sostatt ikki at skiljast, sum talan er um høvund, ið tekst við yrkisbókmentir. Samanber eitt nú við yrkissjónleikara, ein ið mótsett áhugaleikaranum er útbúgvin sum og livir av at vera sjónleikari.

## 2.6.3.3. Bókin

Hóast tøkniligu broytingarnar við eitt nú kunningartøkni og elektróniskum fjølmiðlum er bókin framvegis eitt hitt fremsta amboðið hjá borgarunum til tess at søkja sær upplýsing og vitan og til tess at nøkta tørvin á andligum og listaligum upplivingum.

Tað er sostatt ein týðandi fortreyt fyri bókmentapolitikkin, at roknað verður sum givið, at tørvurin á yrkisbókmentum eins og á dygdargóðum føgrum bókmentum og skaldskapi fer at vaksa, hóast skjótu menningina og ógvisligu gongdina inna kunningartøkni og elektróniskar loftmiðlar. Mentamálastýrið gongur í sama viðfangi út frá, at júst henda gongdin á KT og fjølmiðlaøkinum økir um tørvin og týdningin á dygdargóðum bókmentum á føroyskum. Tað hevur kanska ongantíð áður verið so umráðandi, at fólkinum stendur eitt breitt og dygdargott tilboð av føroyskum upprunabókmentum eins og týddum bókmentum í boði.

Tað er sera tungt at reka forlagsvirksemi í Føroyum. Bókaforløgini gera vart við, at teimum tørvar meira stuðul, um føroysk bókaútgáva skal koma í eina trygga legu. Lagt er upp fyri hesum í brotinum um Mentanargrunn Landsins. Føroysk bókaútgáva er eyðkend av óvanliga nógvum og ofta smáum bókaforløgum. Nógv hevði ivaleyst verið vunnið, um bókaforløgini samskipaðu seg í færri, men fakliga og fíggjarliga sterkari bókaforløg.

## 2.6.3.4. Bókmentaráð

Lógin um list og stuðul til listaligt virksemi eigur eisini at fevna um bókmentir. Endamálið við tí partinum av lógini, ið fevnir um bókmentir, er at virka fremjandi fyri føroyskar fagrar bókmentir og fyri atgeingi at føroyskum bókmentum í Føroyum og fremjandi fyri útbreiðslu av føroyskum bókmentum uttanlands. Bókmentaráðið umsitur sjálvt tær upphæddir, ið verða játtaðar ráðnum á løgtingsfíggjarlógini.

Skotið verður upp, at tað sambært lógini verður stovnað eitt bókmentaráð við hesum endamáli:

- at virka til frama fyri bókmentir í Føroyum og í hesum sambandi at stuðla uppundir ein langsiktaðan og mennandi bókmentapolitikk
- at ráðgeva myndugleikum í bókmentaligum spurningum og spurningum til gagns fyri rithøvundar og yrkjarar

- at stuðla rithøvundum og yrkjarum, at skipa fyri skeiðum og annars vegleiða og útvega rithøvundum fakliga vegleiðing í fakligum og sosialum spurningum
- at fremja samstarv millum tey, ið takast við fagrar bókmentir, og onnur listaøki
- at gera uppskot til menningarætlan fyri bókmentaøkið
- Bókmentaráðið kann av tí játtan, sum ráðið hevur til taks, veita stuðul til hesi endamál:
    - til rithøvundar og yrkjarar til egnar verkætlanir
    - til námsferðir
    - til ískoytisveiting, har onnur veiting ikki røkkur
    - til keyp av útgerð, ið er neyðug til tess, at rithøvundur skal kunna røkja sítt starv
    - til eftirútbúgving av rithøvundum og yrkjarum
    - til framflyting av føroyskum bókmentum uttanlands.

Aðrar uppgávur viðvíkjandi bókmentum sum t.d. starvslønir, útgávustuðul v.m. verða røktar av Mentanargrunni Landsins.

Bókmentaráðið skal ummæla umsóknir, sum Mentanargrunnurin, Mentamálastýrið o.o. senda ráðnum til ummælis, og ráðið samstarvar við rithøvundafelag og bókasavnsverk. Bókmentaráðið kann sjálvt umrøða og viðgera allar spurningar av týdningi fyri føroyskar bókmentir, eins og ráðið kann koma við frágreiðingum, áheitanum og yvirlýsingum. Formaðurin í Bókmentaráðnum eigur at vera limur í Mentanarráði Føroya. Bókmentaráðið kann hava skrivstovu felags við LISA, ið fær stuðul úr Mentamálastýrinum at umsita listaráðini.

Landsstýrismaðurin í mentamálum setir Bókmentaráðið, ið hevur 5 limir og kunnu teir verða valdir soleiðis:

- Tveir limir verða valdir eftir tilmæli frá Rithøvundafelagnum
- Ein limur verður valdur eftir tilmæli frá bókaforløgum og bókahandlarum
- Ein limur verður valdur eftir tilmæli frá føroysku Nordbok-limunum
- Ein limur verður valdur eftir egnari avgerð landsstýrismansins, og er hesin formaður.

**Talva 8** *Bókmentaráðið – uppskot um játtanarkarmar 2002-2006*

| **Ætlanarskeið** | **2002** | **2003** | **2004** | **2005** | **2006** |
|---|---|---|---|---|---|
| Virksemið sambært lógarásettu uppgávur Bókmentaráðsins (1) | 0 | 400 | 440 | 484 | 532 |

(1) Roknað er við, at umsiting verður røkt av skrivstovuni hjá LISA.

Gjørt verður vart við, at Rithøvundafelagið hevur í mong ár starvast fyri, at umstøðurnar hjá tí skrivandi fólkinum gerast betri. Ein møguleiki at betra um umstøðurnar hjá rithøvundum er at gera rúm fyri fleiri starvslønum á játtanini hjá Mentanargrunni Landsins. Løgtingslógin um Mentanargrunn Landsins gevur nú møguleika fyri starvslønum, t.e. 1 á 3 ár, 2 á 1 ár, 5 á 6 mánaðar og 5 á 3 mánaðar. Harumframt verður ein 6 mánaða starvsløn latin eftir umsókn til Heiðursgávunevndina. Við teimum broytingum, ið eru tilmæltar í hesum áliti, verða nógv fleiri starvslønir, og skuldu hesar serstakliga komið rithøvundunum til góðar. Rithøvundar eiga eisini at hava høvi at søkja um íverksetanarstuðul frá Mentanargrunninum.

Sí annars *Avmarkaður marknaður* s. 70-92.

Tilmæli:
Mælt verður til, at ein komandi lóg um stuðul til list og listaligt virksemi, hvat bókmentum viðvíkur, verður orðað samsvarandi tilmælunum í hesum tátti.

Tíðarkarmur: 1. januar 2003.

## 2.6.4. Tónlist

### 2.6.4.1. Endamál

Føroyar hava eitt ríkt og fjølbroytt tónleikalív. Tónleikafrálæran í fólkaskúlanum og serstakliga musikkskúlunum hava havt sera stóran týdning fyri tónleikin kring alt landið, og kórvirksemið og orkesturlívið blómar. Innan tann rútmiska tónleikin eru hend sera stór framstig tey seinastu árini, og fleiri føroyskir bólkar eru á høgum yrkisligum støði, um vit samanbera teir við tilsvarandi bólkar í okkara grannalondum. Hóast ta positivu mynd, ið almenningurin hevur av tónleikalívinum í Føroyum, so er tørvur á einum miðvísum tónleikapolitikki, til tess at tónleikur og tónlistaligt virksemi framhaldandi

kunnu mennast. Eins og innan sjónleikin er tað av sera stórum týdningi, at bæði áhuga- og yrkislistin verða stimbraðar og mentar.

Føroyska dansinum tykist lív verða lagað, og hesum kunnu vit ivaleyst takka dansifeløgunum kring landið fyri. Men neyðugt er við einum áhaldandi arbeiði til tess at menna áhugan fyri dansi, kvøðing og kvæðaskaldskapi, serstakliga millum børn og ung. Mentamálastýrið fer at viðgera føroyska dansin í serstakari ætlan.

Ætlanin við álitinum *Mentan og menning* er m.a. at gera eitt meira miðvíst býti av stuðlinum, sum tónleikur fær, umframt at hækka játtanina til tónleikin. Eitt aðalmál er, at so nógv av peninginum kemur tónleikarum til góðar, at sum minst fer til umsiting, og at stuðulin verður øktur.

Endamálið við tónlistapolitikkinum er:

- at geva tónlistini møguleika at mennast
- at geva teimum, sum fáast við hesa listagrein, betri umstøður at virka undir og
- tryggja, at útbúgvin tónlistafólk kunnu liva av teirra listaligu útbúgving
- at tryggja øllum landsins borgarum eitt dygdargott, fjølbroytt og breitt tónleikatilboð
- at tryggja yrkistónleiki góð virkiskor
- at tryggja áhugatónleiki góð virkiskor
- at eggja til samstarv millum áhugatónlist og yrkistónlist, og
- at eggja til betri samstarv millum teir myndugleikar, felagsskapir og einstaklingar, ið takast við tónleik.

### 2.6.4.2. Tónlistaráð

Stovnað verður eitt tónlistaráð. Tónlistaráðið eigur at hava til endamáls at virka til frama fyri føroyskum tónleikalívi, í hesum sambandi rútmiskum tónleiki og klassiskum tónleiki. Ráðið skal fyrst og fremst ráðgeva myndugleikum og verða teimum til hjálpar í spurningum, ið viðvíkja tónleiki. Ráðið umsitur einsamalt ta játtan, sum árliga verður latin ráðnum á løgtingsfíggjarlógunum.

Tónlistaráðið skal eisini:

- frítt kunna taka mál upp og viðgera mál, ið verða hildin at hava týdning fyri føroyska tónlist og føroyskt tónleikalív
- koma fram við yvirlýsingum og áheitanum á myndugleikar og almenning, um ráðið heldur hetta gagna føroyskum tónleikaáhugamálum

- virka fyri samstarvi millum ymsar tónleikagreinir
- samstarva við Musikkskúlaskipanina og ein komandi tónlistaháskúla
- framflyta føroyska tónlist innan- sum uttanlands, herundir veita beinleiðis rakstrarstuðul til tónleikaforløg
- gera uppskot til menningarætlan fyri tónlistaøkið.

Tónlistaráðið skal innan givnu fíggjarkarmarnar eftir umsókn kunna veita stuðul til:

- virksemið hjá yrkisligum orkestrum, kórum og bólkum
- konsertvirksemi, eitt nú spælistøð, sangleikir, tónleikastevnur v.m.
- fast afturvendandi virksemi hjá tónleikabólkum og orkestrum
- kunningar-, dokumentatións- og útgávuvirksemi
- annað virksemi, ið kann virka fremjandi fyri føroyska tónlist, og sum kann menna føroyskan tónleik heima sum úti
- veita stuðul til eftirútbúgving – til einstaklingar so væl sum til sjálvt skeiðvirksemið
- konsertferðir, innanlands og uttanlands
- veita stuðul til útflutning av føroyskum tónleiki.

Tónlistaráðið skal fyri hvørt nýtt fíggjarár gera virkisætlan og uppskot til fíggjarætlan, sum landsstýrismaðurin í mentamálum skal góðkenna.

Tónlistaráðið eigur at hava 7 limir, ið landsstýrismaðurin í mentamálum velur soleiðis:

- fýra limir eftir tilmæli frá tónlistafeløgum eftir reglum, ið landsstýrismaðurin ásetur nærri í kunngerð
- ein lim eftir tilmæli frá Musikkskúlaskipanini
- ein lim, ið er NOMUS-umboð Føroya
- ein lim eftir egnari avgerð, og er hesin limur formaður.

Tónleikur og Sangur eru á løgtingsfíggjarlógini við einari upphædd á kr. 750.000,-. Peningur, sum er settur av til Tónleik og Sang, verður í høvuðsheitum latin meginfeløgum. Verandi játtan á fíggjarlógini, sum í 2002 er kr. 750,000,- verður sambært uppskotinum flutt til Tónlistaráðið at umsita, og mælt verður til, at játtanin verður økt hetta til 2006, sum víst í *talvu 9.* Roknað er við, at fluttar verða kr. 400.000,- í fíggjarárinum 2003 frá Mentamálastýrinum til Tónlistaráðið. Herumframt er roknað við einari øktari játtan kr. 500.000,- í 2003.

**Talva 9** *Tónlistaráðið – uppskot um játtanarkarmar 2002-2006*

| Ætlanarskeið | 2002 | 2003 | 2004 | 2005 | 2006 |
|---|---|---|---|---|---|
| Játtan | 750 | 1.725 | 1.898 | 2.087 | 2.296 |

Tað kann í hesum tátti vera hóskandi at minna á nøkur av tilmælunum viðvíkjandi tónleiki úr *Avmarkaðum marknaði*. Í partinum um tónleik verður nógv gjørt burtur úr teimum møguleikum, ið eru í einum betri samstarvi millum fólkaskúlan, miðnámsskúlarnar og musikkskúlan. Mælt verður til, at hesin spurningur verður tikin upp við viðkomandi myndugleikar (sí *Avmarkaður marknaður* s. 108-123).

Formaðurin í Tónlistaráðnum eigur at vera limur í Mentararráði Føroya, og Tónlistaráðið eigur at kunna hava skrivstovu saman við LISA.

Tilmæli:
Mælt verður til, at ein komandi lóg um stuðul til list og listaligt virksemi, hvat tónlistini viðvíkur, verður orðað samsvarandi tilmælunum í hesum broti.

Tíðarkarmur: 1. januar 2003.

## 2.6.5. Leiklist

### 2.6.5.1. Leikpallur Føroya

Hóast leiklistin er rættiliga gomul í Føroyum, kom henda listagrein ikki á fíggjarlógina fyrr enn í 1989, tá ið Leikpallur Føroya varð stovnaður. Leiklistin hevur stóran mentanarligan týdning, eins og hon hevur týdning fyri trivnaðin hjá fólki. Sjónleikur er kostnaðarkrevjandi list av slíkum slagi, ið ikki kann verða hildin uppi av marknaðinum eina. Øll okkara grannalond hava tí leiklistalóggávu, ið tryggjar borgarunum eitt tilboð av sjónleiki og operu. Flestøll lond hava eisini ein tjóðpall, ið røkir serstakar leiklistaligar uppgávur umframt vanligt sjónleika- og operuvirksemi.

Skilt verður millum yrkisleik og áhugaleik, har yrkisleikurin verður framførdur av yrkislærdum sjónleikarum, ið hava sum starv at framføra sjónleik. Áhugaleikur verður røktur av fólki, ið spæla sjónleik av áhuga og hava annað starv enn sjónleik til lívsins uppihald.

Í grannalondum okkara hevur hitt almenna í mong ár stuðlað rakstur

av sjónleikarhúsum. Stuðul verður eisini latin áskoðarafjøldini við ymiskum skipanum við atgongumerkjum, við stuðli til fyritøkur og onnur, ið keypa sýningar. Býtið av stuðulskipanunum er oftast soleiðis, at staturin letur ein part av stuðlinum, og lokalir myndugleikar t.d. kommunur, amt ella len lata annan part tilsamans. Tó er tað soleiðis, at tjóðleikhúsið vanliga bert er fíggjað av statinum.

Leikpallur Føroya er á fíggjarlóginini 2002 við 2,8 mió kr. Í grannalondum okkara er almenni stuðulin ikki nóg mikið til at bera raksturin av leikhúsum og sjónleikarabólkum. Umframt stuðulin frá tí almenna hevur sjónleikur inntøkur frá sølu av atgongumerkjum, lýsingum, sponsorum, stuðli frá almennum og privatum grunnum og norðurlendskum- og evropeiskum grunnum. Skal leiklistin í 2006 nærkast einum fíggjarligum støði, ið er á leið tað sama sum tað norðurlendska støðið, er neyðugt við einari árligari hækking upp á eini 30%.[29] Uppskotið til játtanarkarmar hetta til 2006 er gjørt við støði í hesum.

**Talva 10** *Leiklist – uppskot um játtanarkarmar 2002-2006*

| Ætlanarskeið | 2002 | 2003 | 2004 | 2005 | 2006 |
|---|---|---|---|---|---|
| Játtan | 2.800 | 3.640 | 4.732 | 6.152 | 7.997 |

## 2.6.5.2. Endamál

Endamálið við leiklistapolitikkinum er:

- at geva borgarunum í øllum landinum eitt breitt og dygdargott tilboð av leiklist, tað veri seg av sjónleiki og aðrari palllist
- at seta á stovn tjóðpall í Føroyum
- at menna yrkisleiklist
- at tryggja yrkislærdum sjónleikarum virkismøguleikar í Føroyum
- at skapa góðar fortreytir fyri áhugaleiki
- at menna áhugaleik
- at tryggja eitt úrslitagott samstarv millum yrkisleiklist og áhugaleiklist
- at tryggja útbúgving av sjónleikarum, dansarum og øðrum leikhússtarvsfólki
- at skapa góðar og mennandi karmar fyri sjónleiki fyri børn og ung í Føroyum
- at gera uppskot til menningarætlan fyri leiklistaøkið.

[29] Her skal tó viðmerkjast, at í Norðurlondunum er støðan vanliga tann, at statskassin fíggjar áleið 50% av samlaðu útreiðslunum til leiklistina. Onnur fígging kemur frá lokalum myndugleikum, grunnum og privatum sponsorum.

### 2.6.5.3. Mál og langtíðarætlan

Í mong ár hevur verið arbeitt við at seta á stovn ein tjóðpall eftir norðurlendskari fyrimynd í Føroyum. Nú tykist tíðin at verða búgvin til, at arbeitt verður meira málrættað og ítøkiligt við hesum spurningi. Málið eigur at vera, at Føroyar fáa egnan tjóðpall, har leiklistafólk hava sítt dagliga virki, og bæði klassiskur, nútímans, føroyskur og umsettur dramatikkur verður sýndur.

Ein tjóðpallur er sera týdningarmikil fyri eina tjóð. Tjóðpallurin styrkir um samleikakensluna hjá fólkinum í landinum, varðveitir og mennir móðurmálið og er týðandi partur av grundstøðinum fyri varðveitsluni av mentanararvinum hjá einari tjóð – serliga málinum.

Tjóðpallurin skal skapa karmar fyri savning og spjaðing undir einum stovni. Hann savnar tilfeingið, sum er, fyri at kunna útinna leiklist og leiklistahandverk á høgum støði, og hann spjaðir sítt tilfeingi við ráðgeving, hjálp, útláni og turnévirksemi.

Leiklistin kann eitt nú verða skipað soleiðis, at Leikpallur Føroya verður Tjóðpallur Føroya, og kann hesin verða skipaður við tveimum eindum við ávikavist yrkisleiki og áhugaleiki.

### 2.6.5.4. Leiklistaráð

Stýrið fyri Tjóðpall Føroya verður skipað samsvarandi nýggjum raðfestingum, samstundis sum stýrið verður leiklistaráð. Formaðurin eigur at vera limur í Mentanarráði Føroya.

Endamálið við Tjóðpalli Føroya verður framvegis tað sama sum nú:
- at fremja yrkis- og áhugaleiklist og áhuga fyri henni í Føroyum við at fáa sýndan fram sjónleik kring oyggjarnar
- at umsita almenna studningin til leiklist í Føroyum
- á ymiskan hátt at stimbra tað virksemi, ið er frammanundan um allar Føroyar við at hjálpa og vegleiða áhugaðum bólkum, feløgum og einstaklingum
- at skipa fyri útbúgving við skeiðum o.ø.
- so hvørt sum stovnurin mennist at fáa í lag veruliga næmingaútbúgving, og
- at skipa fyri royndum og gransking fyri at finna fram til ein føroyskan leikhátt í samsvari við siðsøgu okkara.

Tey seinastu árini hevur Mentamalástýrið lagt doyðin á at styrkja

yrkisleiklistina og hevur útvegað játtan til yrkisliga leiðslu og umsiting av einasta yrkisleikhúsinum í Føroyum. Hesin táttur eigur at útbyggjast.

Mælt verður til, at leiklistaøkið verður skipað við løgtingslóg um leiklist. Henda lóg eigur at heimila landsstýrismanninum at veita stuðul til áhugaleiklist, til yrkisleiklist og til at seta á stovn Tjóðpall Føroya.

Tilmæli:
Mælt verður til, at gjørt verður uppskot til lóg um stuðul til leiklist og Tjóðpall Føroya. Tjóðpallur Føroya eigur at verða settur á stovn í seinasta lagi 1. januar 2004.

# Samandráttur

Álitið *Mentan og menning* staðfestir, at føroysk mentan er sterk og fjølbroytt - at vit eiga nógv gávurík og virkin listafólk. Hetta er ein týðandi fortreyt fyri álitinum. Í teimum avbjóðingum, sum altjóðagerðin og samskiftiskollveltingin bera við sær, tryggja mentan og list støðufesti og samleika. Atgongd almenningsins til góð og breið mentanartilboð er fortreyt fyri andligum og tímiligum trivnaði, og ikki minni týðandi er virkin luttøka í mentanar- og listalívinum. Tað ræður tí um at geva list og listafólkum góðar karmar og mennandi virkiskor. Hetta kann verða gjørt við at reka ein virknan og miðvísan mentanarpolitikk við greiðum málum, ítøkiligum innihaldi, uppskotum um íverkseting og kostnaðarmetingum.

Við støði í meginregluni um armslong verður mentanarpolitikkurin grundaður á tveir aðalhyrnissteinar, nevniliga ein umskipaðan *Mentanargrunn Landsins* og á uppskot um at skipa listøkið við *listaráðum*.

Í álitinum verður mælt til, at Mentanargrunnur Landsins verður flaggskipið í mentanarpolitikkinum. Mentanargrunnurin eigur at verða umskipaður til ein lista-, mentanar- og filmsgrunn. Samsvarandi hesum eigur leiðslubygnaður grunsins at verða broyttur. Fortreytin fyri, at Mentanargrunnur Landsins kann røkka nýggju málunum og koma at virka eftir hesi ætlan, er, at játtanin til grunnin á fíggjarlógini hækkar við í minsta lagi 30% um árið hetta fram til 2006, tá grunnurin eigur at verða komin uppá umleið 9 mió. kr.

Við uppskotinum um listaráð verður løgd fram ein menningarætlan fyri listaøkið. Listaráðini skulu styrkja og menna myndlist, bókmentir, tónlist og leiklist í Føroyum. Mælt verður til, at skipa listaráðini við løgtingslóg um stuðul til list og listaligt virksemi. Eisini verður mælt til, at játtanin til skapandi og útinnandi list verður økt. Herumframt verður mælt til, at partur av játtan Mentamálastýrisins verður fluttur til listaráðini at umsita.

Til tess at hesin mentanarpolitikkur skal kunna eydnast, er neyðugt, at Listafólkasamband Føroya, LISA, kann virka sum eitt sterkt og vælskipað meginfelag hjá teimum mongu listafeløgunum. Mælt verður tí til, at LISA kemur á løgtingsfíggjarlógina soleiðis, at LISA við eini vælvirkandi skipan og skrivstovu kann røkja allar meginfelagsuppgávur og tænastur.

Saman við løgtinginum hevur Mentamálastýrið framvegis hægstu politisku og fyrisitingarligu ábyrgdina av listapolitikkinum, men verður politikkurin formaður og settur í verk í tøttum samstarvi við listaráðini hvørt á sínum øki. Hetta er fyri at tryggja gott samstarv millum myndugleikar og listafólk, samstundis sum fyrilit verður havt fyri meginregluni um armslongd.

Víst verður í álitinum eisini á møguleikarnar fyri menning, sum liggja í eini samvinnu millum mentan og vinnulív, og í einum øktum samstarvi millum listaøkið, kommunur og lokalsamfelag.

Fíggjarliga fortreytin fyri, at hesin mentanarpolitikkur skal eydnast, er, at játtanin til skapandi og útinnandi list verður í minsta lagi soleiðis sum tilskilað í talvu 11, og at skapast kann ein breið politisk semja um mentanarpolitikkin tey komandi fimm árini.

**Talva 11** *Mettir játtanarkarmar fyri listaøkið 2002-2006*

| **Ætlanarskeið** | **2002** | **2003** | **2004** | **2005** | **2006** |
|---|---|---|---|---|---|
| 1 Mentanargrunnur Landsins | 3.000 | 4.500 | 5.850 | 7.605 | 9.887 |
| 2 Játtan mentanarpolitisk endamál | 1.700 | 770 | 847 | 932 | 1.025 |
| 3 Mentanarsamstarv í Útnorði | 250 | 400 | 440 | 484 | 532 |
| 4 Norðurlendskt mentanarsamstarv | 250 | 375 | 413 | 454 | 499 |
| 5 Altjóða samstarv | 250 | 275 | 303 | 333 | 366 |
| 6 LISA[1] | 350 | 385 | 424 | 466 | 512 |
| 7 Myndlistaráðið | 0 | 400 | 440 | 484 | 532 |
| 8 Bókmentaráðið | 0 | 400 | 440 | 484 | 532 |
| 9 Tónlistaráðið | 750 | 1.725 | 1.898 | 2.087 | 2.296 |
| 10 Leiklist | 2.800 | 3.640 | 4.732 | 6.152 | 7.997 |
| **Tilsamans** | **9.350** | **12.870** | **15.767** | **19.481** | **24.178** |

[1] Íroknað kr. 100.000 frá Tórshavnar Býráð

# Heimildir

Avmarkaður marknaður, Tórshavn 1996.
Bakke, Marit: Spillet om kulturen, Århus 1988.
Bekendtgørelse for teater nr. 91, 29. februar 2000.
Betænkning om Billedkunst – nr. 1360, 3. august 1998.
Bille Hansen, Trine: Kulturens økonomiske betydning, København 1993.
Budgetanalyse 2000, Nordisk Ministerråd.
Danmarks kreative potentiale, København 2000.
Den kreative alliance, København 2000.
De nordiske velfærdsstater, Nordisk Ministerråd, 2000.
Duelund, Peter: Kunstens vilkår, København 1994.
Duelund, Peter: Den danske kulturmodel, Århus 1995.
Forchhammer, Jette: Færøsk kulturpolitik, København 2001.
Føroyskur dansur, álit um kvøðing og dans í skúlanum, 1994.
Føroyskur førleiki 1-2, Tórshavn 1999.
Girard, August: Kulturpolitik. Teori og praksis, København 1973.
Grut, Ulla: Kunsten i samfundet, 1995.
Kulturpenge 2000, København 2000.
Kultur og uddannelse – fremtidens forudsætning. Mentamálarauðuneytið, Reykjavík 1995.
Kunst i Netværkssamfundet, Kulturministeriet 2001.
Langsted, Jørn: Kulturøkonomi – en britisk og en tysk undersøgelse, Århus 1990.
Langsted, Jørn: Strategies. Studies in Modern Cultural Policy, Århus 1990.
Mangset, Per: Kultur og forvaltning. Innføring i kulturpolitik, Oslo 1992.
Mangset, Per: Kulturpolitiske modeller i Vesteuropa. Kulturårboka, Oslo 1995.
Mentanet. Álit, handað landsstýrismanninum í mentamálum 31. mai 2000.
Nordiska samarbetsorgan, Nordiska Ministerrådet, 1997.
Nordisk kulturpolitisk samarbejde ved årtusindskiftet, København 1999.
Nordisk værdigrundlag og nordisk identitet, Nordisk Ministerråd, København 2000.
UNESCO: European Symposium on the Status of the Artist, Helsinki 1992.
Vestheim, Geir: Kulturpolitikk i det moderne Norge, Oslo 1995.
Öppet för Världens vindar, Norden, Nordiska Ministerrådet, København 2000.

# Hagtøl

**Talva 12** *Landskassans útreiðslur til mentan í 1.000 kr.*

| | 1998<br>R | 1999<br>R | 2000<br>R | 2001<br>J | 2002<br>F |
|---|---|---|---|---|---|
| **Skapandi og útinnandi virksemi** | **5.973** | **6.271** | **7.279** | **9.176** | **8.876** |
| Stuðul til skapandi og útinnandi og list | 2.200 | 2.694 | 3.003 | 3.500 | 3.500 |
| Tónlist | 570 | 546 | 600 | 750 | 750 |
| Leiklist | 2.407 | 2.000 | 2.250 | 3.050 | 3.050 |
| Norðurlandahúsið | 796 | 1.031 | 1.026 | 876 | 876 |
| Filmur o.a. | 0 | 0 | 400 | 1.000 | 700 |
| | | | | | |
| **Mentanararvur** | **24.461** | **27.878** | **28.759** | **30.074** | **31.508** |
| Bókasøvn | 10.298 | 11.086 | 11.076 | 12.981 | 14.301 |
| Skjalasavn | 1.941 | 2.221 | 2.300 | 2.445 | 2.633 |
| Søvn [1] | 12.222 | 14.271 | 15.123 | 13.703 | 14.261 |
| Menning og stuðul | 0 | 300 | 260 | 945 | 313 |
| | | | | | |
| **Løgur** | **1.142** | **1** | **1.000** | **2.800** | **4.100** |
| Løgur til mentanararv | 1.142 | 1 | 0 | 800 | 1.500 |
| Løgu til listaútbúgving | 0 | 0 | 1.000 | 2.000 | 2.600 |
| | | | | | |
| **Ítrótt** | **4.879** | **7.689** | **8.042** | **7.717** | **7.792** |
| Ítrótt, stuðul | 4.579 | 4.739 | 4.650 | 4.650 | 4.725 |
| Ítrótt, anleggsstuðul | 300 | 2.950 | 3.392 | 3.067 | 3.067 |
| | | | | | |
| **Annað mentanarligt og listaligt virksemi** | **3.332** | **4.444** | **6.285** | **7.668** | **7.424** |
| Millumlanda samstarv | 348 | 385 | 336 | 400 | 400 |
| Stuðul til ungmannafeløg og skótarørsla | 620 | 620 | 620 | 620 | 620 |
| Stuðul til børn og ung (veddingarpengar) | 0 | 0 | 1699 | 900 | 900 |
| Ungdóms- og bygdahús | 0 | 600 | 405 | 300 | 300 |
| Stuðul til ymisk endamál [2] | 488 | 616 | 988 | 2.000 | 1.700 |
| Ymiskt til mentan | 1.876 | 2.223 | 2.237 | 3.448 | 3.504 |
| | | | | | |
| **Tilsamans** | **39.787** | **46.283** | **51.365** | **57.435** | **59.700** |

1. Jarfrøðisavnið er frá 2001 undir Oljumálastýrinum
2. Stuðul til m.a. konsertir, framsýningar, framflyting av list, keyp av list, Listastevnu Føroya og mentanarligar ráðstevnur.

*Kelda: Landskassaroknskapurin*

**Talva 13** *Landskassans útreiðslur til mentan í 1.000 kr.*

| | 1998 | 1999 | 2000 | 2001 | 2002 |
|---|---|---|---|---|---|
| | R | R | R | J | F |
| **Skapandi og útinnandi virksemi** | **5.973** | **6.271** | **7.279** | **9.176** | **8.876** |
| Stuðul til skapandi og útinnandi list | 2.200 | 2.694 | 3.003 | 3.500 | 3.500 |
| Mentanargrunnur Landsins | 1.700 | 2.200 | 2.500 | 3.000 | 3.000 |
| Heiðursgávur | 500 | 494 | 503 | 500 | 500 |
| Tónlist | 570 | 546 | 600 | 750 | 750 |
| Leiklist | 2.407 | 2.000 | 2.250 | 3.050 | 3.050 |
| Leikpallur Føroya | 1.700 | 2.000 | 2.000 | 2.800 | 2.800 |
| Sjónleikarhús | 707 | 0 | 250 | 250 | 250 |
| Norðurlandahúsið | 796 | 1.031 | 1.026 | 876 | 876 |
| Filmur o.a. | 0 | 0 | 400 | 1.000 | 700 |
| Stuðul til framleiðslu av føroyskum loftmiðlatilfari | 0 | 0 | 400 | 1.000 | 700 |
| | | | | | |
| **Mentanararvur** | **24.461** | **27.878** | **28.759** | **30.074** | **31.508** |
| Bókasøvn | 10.298 | 11.086 | 11.076 | 12.981 | 14.301 |
| Skjalasavn | 1.941 | 2.221 | 2.300 | 2.445 | 2.633 |
| Søvn | 12.222 | 14.271 | 14.513 | 13.703 | 14.261 |
| Føroya forniminnisavn, rakstur | 5.648 | 5.363 | 6.471 | 6.059 | 6.524 |
| Føroya náttúrugripasavn [1)] | 3.559 | 4.204 | 5.484 | 3.269 | 3.528 |
| Bygdasøvn | 1.039 | 1.411 | 275 | 1.889 | 1.589 |
| Friðað hús og fornminni | 370 | 1.267 | 461 | 519 | 543 |
| Listasøvn | 1.606 | 2.026 | 1.822 | 1.967 | 2.077 |
| Menning og stuðul | 0 | 300 | 870 | 945 | 313 |
| Menning av mentanar og mentanararvi | 0 | 300 | 260 | 445 | 313 |
| Stuðul til varveiting av mentanararvi | 0 | 0 | 610 | 500 | 0 |
| | | | | | |
| **Løgur** | **1.142** | **1** | **1.000** | **2.800** | **4.100** |
| Løgur til mentanararv | 1.142 | 1 | 0 | 800 | 1.500 |
| Føroya Fornminnissavn | 1.071 | 0 | 0 | 0 | 0 |
| Kirkjubømúrurin | 71 | 1 | 0 | 800 | 1.500 |
| Løgu til listaútbúgving | 0 | 0 | 1.000 | 2.000 | 2.600 |
| Lista- og tónlistaskúli Føroya | 0 | 0 | 1.000 | 2.000 | 2.600 |

| | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|
| **Ítrótt** | **4.879** | **7.689** | **8.042** | **7.717** | **7.792** |
| Ítrótt, stuðul | 4.579 | 4.739 | 4.650 | 4.650 | 4.725 |
| Fótbóltssambandið | 700 | 700 | 900 | 900 | 900 |
| Talvsambandi | 100 | 100 | 100 | 100 | 125 |
| ÍSF | 2.360 | 2.360 | 2.000 | 2.000 | 2.000 |
| ÍSB | 0 | 100 | 150 | 150 | 200 |
| Stuðul til ferðir innanoyggja | 1.419 | 1.479 | 1.500 | 1.500 | 1.500 |
| Ítrótt, anleggstuðul | 300 | 2.950 | 3.392 | 3.067 | 3.067 |
| Ítróttahús | 0 | 0 | 217 | 467 | 0 |
| Graslíkisvallir og grasvallir | 300 | 2.950 | 3.175 | 2.600 | 0 |
| Ítróttaanlegg | 0 | 0 | 0 | 0 | 3.067 |
| | | | | | |
| **Annað mentanarligt og listaligt virksemi** | **3.332** | **4.444** | **6.285** | **7.668** | **7.424** |
| Millumlanda samstarv | 348 | 385 | 336 | 400 | 400 |
| Før., Ísl. og Grønl. mentanarsamstarv | 198 | 235 | 186 | 250 | 250 |
| Nørrøna felagið | 150 | 150 | 150 | 150 | 150 |
| Stuðul til ungmannafeløg og skótarørsla | 620 | 620 | 620 | 620 | 620 |
| Stuðul til børn og ung (veddingarpengar) | 0 | 0 | 1699 | 900 | 900 |
| Ungdóms- og bygdahús | 0 | 600 | 405 | 300 | 300 |
| Stuðul til ymisk endamál [2)] | 488 | 616 | 988 | 2.000 | 1.700 |
| Ymiskt til mentan | 1.876 | 2.223 | 2.237 | 3.448 | 3.504 |
| Handritanevnd | 0 | 16 | 22 | 35 | 35 |
| Føroyahúsið í Keypmannahavn | 1.033 | 1.183 | 1.183 | 1.283 | 1.283 |
| Málnevndin | 293 | 287 | 302 | 399 | 430 |
| Orðabókagerð | 250 | 400 | 400 | 1.400 | 1.400 |
| Filmaeftirlitið | 300 | 337 | 330 | 331 | 356 |
| | | | | | |
| **Tilsamans** | **39.787** | **46.283** | **51.365** | **57.435** | **59.700** |

1. Jarfrøðisavnið er frá 2001 undir Oljumálastýrinum
2. Stuðul til m.a. konsertir, framsýningar, framflyting av list, keyp av list, Listastevnu Føroya og mentanarligar ráðstevnur.

*Kelda: Landskassaroknskapurin*

## **Talva 14** *Føroysk bókaútgáva í 2000 eftir upprunamáli*

| **Týðingar til føroyskt** | **Fagur bókmentir í ób. máli I A** | **í b. máli II A** | **Yrkis-bók-mentir B** | **Læru-bøkur C** | **Barna-bøkur D** | **Til-samans E** | **Býti í % F** |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Úr amerikonskum | 1 | | 1 | | 1 | 3 | 4,6 |
| - donskum | 2 | | 3 | 2 | 9 | 16 | 24,2 |
| - enskum | 2 | | 2 | | 12 | 16 | 24,2 |
| - íslendskum | 2 | | | | 2 | 4 | 6,1 |
| - norskum | 3 | | 1 | | 3 | 7 | 10,6 |
| - svenskum | 3 | | | | 4 | 7 | 10,6 |
| - týskum | | | | | 2 | 2 | 3,0 |
| - øðrum málum | 3 | 1 | 6 | | 1 | 11 | 16,7 |
| Týðingar tilsamans | 16 | 1 | 13 | 2 | 34 | 66 | 38,8 |
| Upphavsv. á føroyskum | 7 | 10 | 62 | 22 | 3 | 104 | 61,2 |
| **Tilsamans** | **23** | **11** | **75** | **24** | **37** | **170** | **100,0** |

1. í ób.=óbundnum máli, í b.= í bundnum máli

*Kelda: Føroya Landsbókasavn* http://www.flb.fo/

## **Talva 15** *Føroysk bókaútgáva eftir bókmentagreinum*

| **Ár** | **Fagurbókmentir í ób. máli I A** | **í b. máli II A** | **Yrkis-bókmentir B** | **Læru-bøkur C** | **Barna-bøkur D** | **Bøkur tilsamans E** |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 2000 | 23 | | (16) | 11 | (1) | 75 (13) |
| 24 | (2) | | 37 | (34) | 170 | (66) |
| 1999 | 8 (2) | 8 (1) | 68 (11) | 11 (2) | 26 (21) | 121 (37) |
| 1998 | 11 (6) | 7 (1) | 57 (5) | 28 (4) | 54 (45) | 157 (61) |
| 1997 | 10 (4) | 5 (1) | 47 (9) | 22 | 45 (40) | 129 (54) |
| 1996 | 13 (6) | 3 (1) | 51 (9) | 23 (5) | 50 (43) | 140 (64) |
| 1995 | 9 (3) | 3 | 62 (9) | 28 (12) | 53 (50) | 155 (74) |
| 1994 | 8 (3) | 7 (1) | 39 (9) | 35 (18) | 40 (36) | 129 (67) |
| 1993 | 7 (2) | 4 (1) | 34 (8) | 23 (6) | 36 (30) | 104 (47) |
| 1992 | 7 (3) | 5 (2) | 39 (11) | 23 (8) | 43 (33) | 117 (57) |
| 1991 | 12 (7) | 3 (0) | 32 (8) | 7 (5) | 65 (50) | 119 (70) |
| 1990 | 11 (4) | 7 (1) | 48 (7) | 31 (7) | 64 (53) | 161 (72) |

Viðm. Tølini í klombrum eru týðingar

*Kelda: Føroya Landsbókasavn* http://www.flb.fo/